SEV

# Norðurlendskur umhvørvisvinnari 2015




NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2015

**Ársfrágreiðing og Ársroknskapur 2015**
Ársaðalfundur 29. apríl 2016
Myndir: Fotostudio/Finnur Justinussen, Alan Brockie, Ólavur Frederiksen, Regin Joensen, Kári Durhuus, Jákup Suni Lauritsen, Johannes Jansson, Magnus Froderberg, Torbjørn Jacobsen og SEV
Forsíðumynd: Norðurlendska umhvørvisvirðislønin 2015

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

# Innihaldsyvirlit


Frágreiðing frá nevndini . . . 2
Týðandi hendingar síðani seinasta aðalfund felagsins . 7
Elorkan var 60 prosent grøn í 2015 . . . 8
SEV vann norðurlendska virðisløn . . . 11
SEV gav Páls Høll norðurlendsku virðislønina . . . 15
SEV fekk grønu virðislønina . . . 20
Grøna kósin hjá SEV er sannførandi . . . 23
SEV setti nógv met í 2015 . . . 26
Týðandi íløgur og útbyggingar . . . 28
Grøna føroyska elorkan á arktiskari ráðstevnu . . . 30
Íslendski forsetin vitjaði SEV . . . 33
Løðistøðir settar upp kring landið . . . 34
SEV hitar Páls Høll . . . 35
Undirvísing í Húsahaga . . . 36
Gravgangur eftir størvum í SEV . . . 37
Góð úrslit av miðvísum HR-arbeiði . . . 38
Starvsfólkahópurin . . . 41
Heilsa, trygd og umhvørvi . . . 43

**Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2015 . . . 49**
Elfelagið SEV – ársfrásøgn fyri 2015 . . . 50
Leiðsluátekning . . . 51
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . 52
Høvuðs- og lyklatøl . . . 53
Leiðslufrágreiðing . . . 54
Nýttur roknskaparháttur . . . 68
Rakstrarroknskapur 1. januar–31. desember . . . 72
Fíggjarstøða 31. desember . . . 73
Peningastreymsuppgerð . . . 75
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . 76
Rakstrarbýti, framleiðsla og net . . . 79
Notur . . . 80

*Nevnd og leiðsla í SEV. Aftara rað frá vinstru: Karl M. Rasmussen, nevndarlimur, Finn Jakobsen, deildarstjóri, Anders Nedergaard-Hansen, deildarstjóri, Frits Poulsen, nevndarlimur, Bødvar Hjartvarsson, nevndarlimur og Steinbjørn O. Jacobsen, nevndarlimur. Fremra rað frá vinstru: Bogi Bendtsen, deildarstjóri, Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, Hákun Djurhuus, stjóri, Bogi Andreasen, næstformaður, og Karl A. Olsen, nevndarlimur.*

# Frágreiðing frá nevndini

Bæði heima í Føroyum og úti í heimi verður tikið í álvara, at SEV hevur lagt seg á grønu kósina. Nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn staðfesti í samgonguskjalinum visiónina um, at Føroyar í 2030 skulu vera 100 prosent grønar, tá ið tað snýr seg um orkunýtslu á landi.

Hin 27. oktober í ár læt Norðurlandaráðið SEV árligu náttúru- og umhvørvisvirðislønina við grundgevingini: *"Prisen går til det færøske elselskab SEV for dets ambitiøse mål og innovative tiltag for en grøn elektrificering af det færøske el-net. Arbejdet er ikke kun af betydning for indfasningen af fornybar energi på Færøerne, men også for det europæiske net. På grund af dets ambitiøse mål og kreative indsats for at reducere brugen af fossile brændstoffer er SEV en værdig vinder af Nordisk Råds natur- og miljøpris 2015".*

Aksel Johannesen, løgmaður, segði í røðu síni í Norðurlandaráðnum sama dag, sum virðislønin var latin um kvøldið, at Føroyar eru farnar undir eina grøna kollvelting. Samanumtikið staðfestingar og viðurkenning av, at SEV gongur undan, og at felagið er á rættari leið.

Elfelagið er eisini vorðið búskaparliga sterkari seinastu tvey árini, og í 2015 var avlopið 103 milliónir krónur. Hetta avlop skal brúkast til eginfígging í sambandi við nógvu útbyggingarnar, sum liggja fyri framman. Tað eru eitt nú íløgur í framleiðslu úr fleiri grønum orkukeldum og til útbyggingar av oljuriknu verkunum, sum framhaldandi verða okkara tiltakstrygd í nógv ár aftrat, tó at málið er 100 prosent grøn elorka í 2030.

Avbjóðingin hjá SEV er framvegis veitingarskylda og støðug streymveiting øðrumegin – og grønar útbyggingar, umhvørvisvernd og sveiggjandi oljuprísir hinumegin. Men grønari vit verða, minni er oljan ein búskaparlig hóttan ímóti SEV og harvið føroyska samfelagnum, samstundis sum umhvørvisverndin økist.

SEV skal áhaldandi nøkta tørvin á elorku, samstundis sum skundast skal undir elektrifiseringina av samfelagnum. Í gerandisdegnum er hendan avbjóðingin stór og spennandi, og virksemið er nógv og fjølbroytt. Talan er um avbjóðandi uppgávur, sum okkara dugnaligu starvsfólk dagliga greiða úr hondum í sínum arbeiði, sum fer fram undir virðsorðunum *Samstarv, Eldhugi og Virðing* – SEV.

Virksemið hjá SEV síðani seinasta ársaðalfund verður lýst nærri í hesi frágreiðing, har nevndin lýsir tey mál, sum hon metir hava størstan áhuga hjá eigarunum. Frágreiðingin verður latin sambært grein 3, stk. 12b og grein 4, stk. 11a í viðtøkum felagsins.

## Fjølbroytt virksemi

Loyvið til nýtslu av vatnkraftini fór formliga úr gildi 5. oktober 2013. Síðani tá hevur Vinnumálaráðið javnan formliga longt loyvið nakrar mánaðir í senn, meðan tey hava arbeitt við at orða nýtt loyvi. Hin 1. juli 2015 fekk SEV ætlanarskriv um nýggjar loyvistreytir viðvíkjandi vatnkraftini. Sama dag fekk SEV noktandi svar upp á umsókn felagsins um loyvi at gera pumpuskipan á verandi verkum í Vestmannaøkinum, og treytaða tilsøgn um framleiðsluloyvi til pumpuskipan í Vetsmannaøkinum, sum ikki fevnir um Heygadal og Mýrarnar. SEV fekk eisini avrit av longda og víðkaða fyribilsloyvinum til Sp/f Røkt, har myndugleikin gevur Røkt treytað fyribils loyvi til pumpuskipan ímillum Heygadal og Mýrarnar. Nevndin í SEV er ikki nøgd við viðgerðina og niðurstøðurnar hjá myndugleikanum. Royndir vórðu beinanvegin gjørdar at fáa táverandi løgmann Kaj Leo Holm Johannesen at kanna málið, men hesum spurdist einki burturúr. SEV valdi eisini at kæra avgerðina hjá myndugleikanum til Vinnukærunevndina. Heilsu- og innlendismálaráðið viðger í løtuni treytirnar fyri nýggjum vatnloyvi, samstundis sum verandi loyvi er longt til 30. apríl 2016.

Á eykaaðalfundi í SEV 19. juni 2015 var einmælt samtykt, at nevndin í SEV fær loyvi og heimild at avhenda tær fimm vindmyllurnar í Neshaga til eitt partafelag, ið er 100 prosent dótturfelag hjá SEV, og at avgreiða øll viðurskifti í hesum sambandi. Eykaaðalfundurin gav eisini loyvi og heimild til at avhenda tær 13 vindmyllurnar í Húsahaga til eitt partafelag, ið er 100 prosent dótturfelag hjá SEV, og at avgreiða øll viðurskifti í hesum sambandi.

Í sambandi við hesa umskipan, sum m.a. kravdi broytingar av



viðtøkunum hjá SEV, settu bæði Vinnumálaráðið og Almannamálaráðið fram treytir um, at tey taka endaliga støðu til ítøkiligu ætlanirnar, tá ið ráðini fáa uppskotini til stovningarsamtyktir og viðtøkur til góðkenningar. Arbeitt verður í løtuni við at stovna hesi bæði dótturfeløgini, sum skulu virka frá 1. januar 2016. Hetta arbeiðið inniheldur m.a metingar av ognunum, avhendingarskjøl, stovningarsamtyktir, viðtøkur, tekningarskjøl, prísavtalur millum SEV (net) og feløgini, fíggjarætlan fyri 2016 og samskifti við m.a. Elveitingareftirlitið, Heilsu- og innlendismálaráðið, og fíggjarveitarar hjá SEV.

Felagið hevur arbeitt við uppskoti um serfrøði í nevndina hjá SEV. Eftir viðgerðina av uppskotinum á ársaðalfundi 24. apríl 2014 læt elfelagið uppskotið til Vinnumálaráðið og fyrrverandi Innlendismálaráðið, har spurt var eftir viðmerkingum teirra. Á ársaðalfundi 24. apríl 2015 var kunnað um, at uppskotið ætlandi verður lagt fyri ein komandi aðalfund, tá svar er komið frá myndugleikunum. Hin 29. september 2015 spurdi felagið seg fyri hjá Vinnumálaráðnum, og tá varð svarað, at málið nú er lagt yvir til Heilsu- og innlendismálaráðið til viðgerðar. Spurningurin er umrøddur á fundi millum felagið og ráðið 4. mars 2016, men einki svar er komið frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Nevndin fegnast um eitt gott og tætt samstarv við landspolitisku skipanina, eftir at nýggja samgongan fór til verka. Tikið verður undir við orkupolitikki landsins, sum er lagdur fyri dagin í samgonguskjalinum. Umráðandi er, at vit í Føroyum við tí avmarkaða tilfeingi, sum er til taks, í hesum lítla samfelag, samstarva og nýta tilfeingið á skilabesta hátt, soleiðis at virðisøkingin verður størst møgulig landinum at frama.

Saman við heiðrinum at vinna virðisløn Norðurlandaráðsins innan náttúru og umhvørvi í 2015 fylgdi eisini við ein peningaupphædd á 350.000 krónur. Nevndin hevði frammanundan avgjørt, at um SEV vann, so skuldi upphæddin latast óskerd sum stuðul til eina lyftu til rørslutarnað, sum vitja Páls Høll. Hin 27. november 2015 var almenn móttøka í hølunum hjá Dansifrøi í Tórshavn, har SEV hátíðarhelt viðurkenningina, og stjórin í SEV handaði tá nevndarformanninum fyri Páls Høll upphæddina.

SEV hevur í nógv ár átt 20 prosent av P/F FDS, sum m.a. tókst við kortgerð og rak heimasíðuna www.kortal.fo. Hetta felag er nú avtikið, og virksemið er lagt yvir til Umhvørvisstovuna.

## Útbyggingar innan varandi orku

Battaríiskipanin til vindmyllulundina í Húsahaga er nú sett upp, og hon verður innkoyrd í løtuni. Innkoyringin væntast at taka ein mánað, og battaríiskipanin verður væntandi komin í vanligan rakstur fyrst í mai mánaði.

Saman við starvsfólkum hjá SEV, Jarðfeingi og Vinnumálaráðnum var nevndin í 2015 á vitjan í Týsklandi fyri at hyggja nærri at battaríiskipanini hjá SEV. Hetta battaríið hevur eina goymslu á 2,3 MW / 0,7 MWh. Eisini var vitjað hjá Wemag, sum hevur eina 5

MW / 5 MWh battaríksipan í Schwerin í Týsklandi, og seinni sama dag var vitjað hjá Younicos, sum hevur ment stýrisskipanina til hetta størsta battaríið í Týsklandi.

Í løtuni verður arbeitt við at reisa vindmátimastur í Suðuroy. Roknast kann við, at Orka, sum er nýggj deild hjá Umhvørvisstovuni, ið nú umsitur elorkuøkið, ger eitt útbjóðingarumfar við vindorku í Suðuroy í ár. Avtalað er millum Orku og SEV, at í fyrsta umfari rindar SEV fyri ymiskar kanningar, ið gerast skulu, og verður tað soleiðis, at tann, sum vinnur útboðið, endurrindar SEV kostnaðirnar, samstundis sum hesir verða roknaðir inn í boðið.

Farið er undir at seta upp løðistøðir til elbilar. Fyrsta støðin varð sett upp í Klaksvík stutt fyri jól í 2015. Í 2016 er ætlanin at seta upp løðistøðir í Tórshavn, á flogvøllinum, í Runavík, við Streymin, á Sandoynni og í Suðuroy. Á hendan hátt verður mett, at undirstøðukervið við bráðfeingis løðimøguleikum er nøktandi.

Samstarvssáttmáli um avlopshita frá Vágsverkinum til Páls Høll er gjørdur.

Við stuðli frá NORA og NAHA verður arbeitt við grønari verkætlan í Stóru Dímun, har kannað verður, hvussu oyggin kann gerast burðardyggari viðvíkjandi orku. Talan er um framleiðslu-skipanir sameindar við battarí ella vetnisgoymslu.

Fyri at kortleggja møguleikarnar innan útbyggingar av elframleiðslu - úr verandi og komandi varandi orkukeldum - í samvirkni við verandi og komandi møguleikar innan orkugoymslur, er kanningarverkætlan sett í verk í einum samstarvi millum Orku, Dansk Energi og SEV. Ætlandi fyriliggja fyrstu úrslitini tíðliga í 2017.

## Aðrar útbyggingar

Útbyggingin við einum nýggjum motori aftrat á Vágsverkinum er komin væl áleiðis. Nakað av seinking er, men ætlandi verður verkætlanin liðug umleið juni í ár. Mett verður, at kostnaðarætlanin heldur.

Arbeitt verður við projekteringini av ætlaðu víðkanini av Sundsverkinum. Talan er um eina nýggja støð 3, sum skal avloysa verandi støð 2, har elstu motorarnir, sum eru frá 1983 og 1988, skjótt fara at fella fyri aldur. Miðað verður ímóti, at eitt endaligt projektuppskot kann leggjast fyri ein eykaaðalfund seinni í ár til støðutakan.

Dagføringin og víðkanin av tangagarðinum á Sundsverkinum er liðug við undantaki av tveimum byggitøkniligum viðurskiftum, sum fyrst kunnu gerast, tá ið dagtangahúsið er bygt. Arbeiðið uppá dagtangahúsið er byrjað, meðan útgerðin er undir projektering og samlaða verkætlanin væntast at verða liðug í seinnu helvt av 2017. Hvat dagtangahúsið og útgerð viðvíkur, so er hesin parturin vaksin munandi - kanska upp í 50 prosent - tí leggjast skal eisini upp fyri veiting og viðgerð av oljuni, sum skal brúkast á støð 3. Ætlaða útbjóðingin av størsta partinum av útgerðini er treytað av, at avgerð verður tikin um at byggja støð 3, og tí bíðar hon eftir hesi avgerð.

Stóri vøksturin í vinnulívinum heldur fram, og hetta merkist eisini á øktum tørvi á streymveiting. Tað gongur skjótt, og tí er avbjóðandi hjá felagnum at fylgja við. Koplingarstøðirnar í Runavík og Inni á Eið í Fuglafirði eru góð dømi um tað. Arbeitt verður sambært langtíðarætlanini fyri útbygging av flutningsnetinum (60 kV), sum áhaldandi verður dagført.

Sum eigarar av P/F Fjarhitafelagnum hava Tórshavnar kommuna og Elfelagið SEV í felag staðfest sína meining um menningina av felagnum og útbyggingar tess. Fjarhitafelagið hevur tikið hetta til eftirtektar og arbeiðir nú við at nágreina og seta upp eina tilsvarandi virkisætlan.

## Tekniski rakstur felagsins

Fossáverkið er nú dagført og nútímansgjørt bæði uttan og innan. Vaktarstøðin, sum eina tíð hevur verið á Eiðisverkinum, er flutt aftur á Fossáverkið.

Á Mýraverkinum er rakstrarrørið málað, og nýggir ventilar eru keyptir til monteringar í summar.

Í Mykinesi, Skúvoy og Fugloy eru dagføringar gjørdar av tangagørðum og alarmskipanum.

Koplingarstøðin á Húsareyni var tikin í nýtslu í mars mánaði 2015. Arbeiðið upp á koplingarstøðina í Runavík er í gongd. Projektering av koplingarstøðini innan Eið er í gongd.

Sjókaðalar um Skálafjørðin og um Fuglafjørð vórðu lagdir í seinnu helvt av 2015.

Stór umlegging og nýgerð er gjørd av netinum í Runavík. Somuleiðis er gjørd umlegging av netinum í Suðurstreymoy millum Sundsverkið, Húsareyn og Varðagøtu, og umleggingar eru eisini gjørdar í Suðuroy.

Málið at skifta allar elmálarar til fjaravlestur verður rokkið 2016. Hildið verður fram at seta málarar í allar transformarastøðirnar, hetta vil m.a. bøta um møguleikarnar hjá SEV at tryggja kundunum eina góða elveiting.

## Stórur tørvur á fígging

Arbeiðið at fáa til vega fígging til komandi útbyggingar næstu árini gongur sína gongd. Ætlanin er at gera avtalu við fíggjarfyriskiparar, ið ætlandi skulu fáa til vega umleið 1,0 milliard krónur sum

ónoterað amerikansk lánsbrøv (US Private Placement). Restin umleið 0,6 milliard krónur, verður ætlandi fingin til vega sum bankafígging.

## Roknskaparúrslit 2015

Úrslit felagsins í 2015 er 103 milliónir krónur. Hetta er eitt nøktandi úrslit, men tað er eisini neyðugt, eftir at SEV fleiri ár á rað fram til 2012 hevði hall, samstundis sum stórar íløgur við tilhoyrandi lántøku standa fyri framman, ið eisini krevja eina munandi eginfígging.

Neyðugt verður við á leið líka so góðum úrslitum eina tíð frameftir, hetta fyri at felagið kann hava ein tryggan búskap í hesum avbjóðandi tíðarskeiðnum við nógvum stórum útbyggingum.

## Fíggjarætlanin 2016

Fíggjarætlanin 2016 er staðfest við einum yvirskoti á 72 milliónir krónur. Gongdin í ávísum útreiðslum gevur eina ábending um, at úrslitið helst verður nakað betri.

## Grønt fyri framman

Tað er hugaligt at taka samanum og kunna staðfesta, at vit eru á rættari kós. Tað er grønt fyri framman, og dagsskráin er fjølbroytt.

Vaksandi eftirspurningurin eftir elorku kann í roynd og veru gerast størsta avbjóðingin hjá SEV nakrantíð.

Framtíðin er í fyrstu atløgu grøn elorka við oljuni sum tiltakstrygd. Longri frammi er málið, at vit sleppa av við oljuna og veita 100 prosent elorku burtur úr varandi orkukeldum. Streymveitingin og dagligi raksturin eru kortini okkara høvuðssetningur í gerandisdegnum, og við síðuna av hesum stóra arbeiðssetningi liggja t.d. viðlíkahald, útbyggingar, gransking og samstarv bæði í Føroyum og uttanlands. SEV skapar arbeiðspláss í Føroyum og dregur nýggja vitan hendan vegin við fjølbroyttum samstarvi við áhugaverdar framleiðarar, veitarar og samstarvsfelagar innan elorku.

Samanumtikið vil SEV tryggja føroyska samfelagnum eina grøna framtíð, sum er búskaparliga burðardygg og tryggjar Føroyum støðuga og varandi elorku frameftir.

Jákup Suni Lauritsen
nevndarformaður
apríl 2016

# Bygnaður


Aðalfundur
Nevnd
Stjóri
Menning
Stjórnarskrivari
HTU-leiðari
Deildarstjóri net
Deildarstjóri fyrisiting
Deildarstjóri framleiðsla
Teknistovan
Vaktin, lastfordeiling
Rakstur
Innleggingar
Elverkfrøði og rakstur koplingarstøðir
Eltøkni
Framleiðslan
Sundsverkið
Vágsverkið
Eiðisverkið
Verkini í Vestmanna
Strond og småverkini
Kundatænasta
Roknskapur
Fyrisitingartoymi
Starvsfólkadeild
KT
Kontrollari

# Týðandi hendingar

## síðani seinasta aðalfund felagsins

# Elorkan var 60 prosent í 2015

Í 2015 framleiddi SEV 60 prosent av elorkuni úr vatni og vindi, samstundis sum elframleiðslan var tann hægsta nakrantíð. Framleiðslan úr olju minkaði góð 16 prosent annað árið á rað



## 42 prosent

*Vatnið munaði sera væl í framleiðslutølunum í 2015, tá 42 prosent av elorkuni komu úr vatnorku.*

# grøn



18 prosent av elorkuni í 2015 stavaðu frá vindorku, har Neshagi og Húsahagi av álvara hava gjørt mun í framleiðslutølunum.



*Vatnbyrgingarnar og Fossáverkið í Vestmanna, sum vóru bygd í fimti- og sekstiárunum, vóru fyrstu stóru útbyggingarnar hjá SEV, ið var stovnað 1. oktober 1946. Vatnorkan var høvuðsorkukeldan fyrstu árini.*

SEV legði enn eitt sera gott og grønt ár aftur um seg, tá ið 2015 fór aftur um bak. Tað vísa framleiðslutølini fyri farna árið, ið sum heild peika rætta vegin.

60 prosent av allari elframleiðsluni stavaðu frá vatni og vindi, og oljuriknu verkini framleiddu sostatt 40 prosent.

– Vit hava rokkið okkara máli fyri 2015, og tað eru vit sera væl nøgd við, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Hann vísir á, at seinastu ferð, SEV framleiddi umleið 60 prosent úr varandi orkukeldum, var í 1973, tá vatnorkan stóð fyri størra partinum av elframleiðsluni, ið tá var nærum fýra ferðir minni enn í dag.

Vindmyllurnar í Neshaga og Húsahaga gera av álvara mun í tølunum, sum vísa, at vindorkuparturin var 17,8 prosent. Tað er ein framgongd í framleiðsluni úr vindi á 61,8 prosent, sammett við 2014. Battarískipanin í Húsahaga verður tikin í nýtslu í ár, og hon hevur til endamáls at gangnýta vindorkuna betur og harvið økja vindorkupartin næstu árini.

Vatnorkan stóð fyri 42,3 prosentum av elframleiðsluni í 2015, og vatnorkuparturin øktist sostatt tilsamans 10,3 prosent, sammett við 2014.

Vatnorkuverkið á Eiði setti met í 2015. Eiðisverkið framleiddi 68,1 GWt í fjør, og talan er um ein vøkstur á 10,2 prosent, sammett við framleiðsluna á Eiðisverkinum í 2014. Útbyggingar á Eiðisverkinum og nýggi tunnilin oman fyri Norðskála og suður ímóti Selatrað eru høvuðsorsøkin til, at tað er møguligt at framleiða meira úr vatnorku.

Framleiðslan á oljuriknu verkunum lækkaði 16,4 prosent, og hetta er annað árið á rað, at oljuframleiðslan minkar umleið 16 prosent.

Elframleiðslan var tann hægsta nakrantíð í 2015. SEV framleiddi 314,4 GWt í 2015, og tað er 2,95 prosent meira enn í 2014, tá ið elframleiðslan tilsamans var 305,4 GWt.


norden
Nordisk Råds
natur- og miljøpris 2015

# SEV vann norðurlendska virðisløn

Nýbrot á orkuøkinum og málið um 100 prosent grøna elorku í Føroyum í 2030 vóru við til at vinna SEV norðurlendsku náttúru- og umhvørvisvirðislønina 2015



*Ein stórsligin pallur við tónleiki, sangi og undirhaldi var karmur um virðislønahandanina í Hørpu í Reykjavík, har Eivør Pálsdóttir var millum listafólkini, sum framførdu.*

Týskvøldið 27. oktober 2015 stendur sum ein varði í søguni hjá SEV. Hetta kvøldið vóru umboð fyri elfelagið stødd í Reykjavík, har norðurlendsku virðislønirnar innan bókmentir, barna- og ungdómsbókmentir, film, tónleik umframt nátturu og umhvørvi vórðu handaðar.

SEV varð tilnevnt til náttúru- og umhvørvislønina saman við 10 øðrum útnevndum úr Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Álandi.

Tónleika- og mentanarhúsið, Harpa, í íslendska høvuðsstaðnum, har Norðurlandaráðið hevði sín árliga fund, var stúgvandi fult av fólki, sum vóru boðin til virðislønahandanina. Millum mongu veitslukløddu gestirnar vóru norðurlendskir politikarar, fjølmiðlafólk, embætisfólk og onnur við tilknýti til virðislønahandanina, sum eisini varð send beinleiðis í íslendskum, norskum og føroyskum sjónvarpi.

Pallurin var settur, og brennandi spurningurin var, hvør av øllum teimum tilnevndu í teimum fimm virðislønarbólkunum skuldi upp á pallin at taka ímóti virðislønunum. Millum SEV-umboðini í Hørpu vóru Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, og Hákun Djurhuus, stjóri.

Tónleikur og gott undirhald rundan um handanirnar settu sín serstaka dám á stóra salin, har m.a. Eivør Pálsdóttir framførdi. Ein brádlig kvirra yvirtók stóru høllina beint framman undan hvørjari virðislønarhandan, og henda bráðtøgnin fekk spenningin millum áskoðararnar í hæddina, og síðani dundu lógvabrestirnir í høllini at fagna teimum, ið fingu virðisløn.

## Stór løta

Tá stundin var komin at handa náttúru- og umhvørvisvirðislønina, var spenningurin stórur hjá nevndarformanninum og stjóranum í SEV, sum vóru til reiðar at taka ímóti, um føroyska elfelagið skuldi verið vinnarin.

So ljóðaði soleiðis á pallinum á norðurlendskum: „*Vinder af Nordisk Råds natur- og miljøpris 2015 – det færøske energiselskabet SEV*“. Fylgdir av hvøllum lógvabrestum fóru Jákup Suni Lauritsen og



*Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, Hákun Djurhuus, stjóri, Kári Durhuus, samskiftisráðgevi, og Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum, stødd í Hørpu, nakrar tímar áðrenn tað var greitt, at SEV vann norðurlendsku virðislønina.*



*Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, v.m., og Hákun Djurhuus, stjóri, vóru bæði kenslubornir og ernir, tá ið teir vegna SEV tóku ímóti náttúru- og umhvørvisvirðislønini 2015, meðan ein stúgvandi full høll eygleiddi handanina, sum eisini var send beinleiðis í íslendskum, norskum og føroyskum sjónvarpi.*

Hákun Djurhuus vegna SEV upp á pallin at taka ímóti norðurlendsku náttúru- og umhvørvislønini 2015.

Reykjavík vann í 2014, og tí handaði borgarstjórin í Reykjavík, Dagur B. Eggertsson, SEV-umboðunum virðislønina við hesum orðum: *„Prisen går til det **færøske elselskab SEV** for dets ambitiøse mål og innovative tiltag for en grøn elektrificering af det færøske el-net. Arbejdet er ikke kun af betydning for indfasningen af fornybar energi på Færøerne, men også for det europæiske net. På grund af dets ambitiøse mål og kreative indsats for at reducere brugen af fossile brændstoffer er SEV en værdig vinder af Nordisk Råds natur- og miljøpris 2015".*

Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, segði í síni takkartalu: *Tak, tak, tusind tak!!! Det er en stor ære for mig som bestyrelses-formand at modtage Nordisk Råds natur- og miljøpris 2015.Vi satser på 100 procent grøn energi på Færøerne i 2030.*

*Vind, vand, sol og tidevand skal føre os i mål sammen med innovative, tekniske løsninger.*

*Det var en stor ære at være blandt de nominerede. Men at stå her med prisen, er så STOR en begivenhed, at vores taknemmelighed næsten ikke kan udtrykkes i ord.*

*Tak til bedømmelseskomitéen og Nordisk Råd. Tak til vores egen ledelse og dygtige medarbejdere. Tak til vores ejere – de færøske kommuner. Tak Færøernes Landsstyre, der understøtter vores grønne kurs. „Takk tit føroyingar, sum hyggja í kvøld".*

*Vi vandt denne gang, men jeg vil bestemt ikke glemme de andre nominerede.*

*Held og lykke med jeres projekter, vi kæmper en fælles kamp.*

## Varði á leiðini

Lukkuynskini til SEV vóru nógv. Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum, var ein teirra, sum beinanvegin heiðraði SEV bæði í Hørpu og á samkomu á føroysku sendistovuni í Reykjavík eftir handanina.

– Norðurlendska náttúru- og umhvørvisvirðislønin er ein stór viðurkenning av ætlanunum hjá SEV at gera Føroyar grønar í



*Vertirnir, Ólafur Egilsson og Charlotte Bøving, sum vóru lívligir og í góðum hýri, settu sín serliga dám á handanina.*



*Nógvir veitsluklæddir gestir savnaðust í Hørpu, tá norðurlendsku virðislønirnar vóru handaðar. Teirra millum vóru politikarar, embætisfólk, fjølmiðlafólk og onnur við tilknýti til handanina.*



*SEV-umboðini, nummar 3 og 4 frá vinstru, saman hinum norðurlendsku virðislønavinnarunum 2015.*



*Nevndarformaðurin og stjórin í SEV gjørdust alsamt spentari, sum stóra løtan nærkaðist.*

2030, og tað hóskar væl til tað, sum samgongan arbeiðir við, so vit hava sett okkum felags mál, segði Sirið Stenberg.

Hon vísti á, at vindmyllulundin í Húsahaga og battarískipanin eru gott dømi um, hvussu innovativt SEV er.

– Virðislønin er greitt tekin um, at okkara grannar síggja, hvussu stórt arbeiði verður gjørt innan varandi orku í Føroyum, sum kann gerast eitt undangonguland innan orkuloysnir. Vit kunnu royna nýggjar skipanir í okkara lítla avbyrgda landi, sum seinni kunnu gagna øðrum størri londum, segði Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum.

Nevndarformaðurin og stjórin í SEV løgdu eisini dent á stóra týdningin, virðislønin hevur fyri SEV og Føroyar.

– SEV og mongu dugnaligu starvsfólkini hava fingið eitt týdningarmikið herðaklapp, sum prógvar, at vit eru á rættari leið, staðfesti Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Hann gjørdi samstundis greitt, at nýbrot og nýhugsan eru ein alneyðugur hugburður at hava næstu 15 árini, um málið um 100 prosent grøna orku á landi í Føroyum í 2030 skal røkkast.

Bæði stjórin og nevndarformaðurin vóru samdir um, at virðislønin er ein týdningarmikil varði á leiðini, sum kann lata hurðar upp og møguliga hava við sær, at SEV kann taka upp nýggj samstørv við týdningarmiklar fyritøkur innan menning av grønum orkuloysnum.

– Náttúru- og umhvørvisvirðislønin hevur ómetaligan týdning, tí hon styrkir okkum sum land og orkutjóð, segði Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður.




*John Henrik Holm, nevndarformaður í Páls Høll, tók ímóti teimum 350.000 krónunum, ið fylgdu við norðurlendsku náttúru- og umhvørvisvirðislønini, sum SEV læt Páls Høll.*

# SEV gav Páls Høll norðurlendsku virðislønina

**Páls Høll fekk ágóðan av norðurlendsku náttúru- og umhvørvisvirðislønini á 350.000 krónur, sum SEV vann og læt langhylinum at brúka til eina lyftu til rørslutarnað. Í hesum sambandi var stór móttøka hildin í Dansifrøi**

Páls Høll er ein verkætlan, har borgarar hava tikið tung tøk fyri at gera dreym til veruleika, og henda verkætlanin líkist grundhugsanini undir SEV, sum er ein samhaldsføst skipan, har lyft verður í felag.

Nevndin í SEV avgjørdi við støði í hesum at lata Páls Høll tær 350.000 krónurnar, sum SEV fekk, tá elfelagið vann norðurlendsku náttúru- og umhvørvisvirðislønina 2015, sum í sjálvum sær var ein stórur heiður fyri føroyska elfelagið.

SEV læt fólksliga átakinum í Vági stuðulin til eina lyftu til rørslutarnað, so allir borgarar fáa javnbjóðis atgongd til langhylin í Vági.

– Verkætlanin í Vági ber bara til, tí fólk lyfta í felag og seta sær eitt mál, sum í fyrstu atløgu kann tykjast ómøguligt, men sum kortini ber á mál, tí allar góðar kreftir fara til verka. Í krónum og oyrum er Páls Høll bert ein brøkpartur av tí, ein líknandi byggiætlan hevði kostað, um hon varð bygd eftir dagsins prísum og bert við løntari arbeiðsmegi, staðfestir Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður i SEV.





# NORÐURLENDSKA NÁTTÚRU-
## – móttøka í Dansifrøi 27. november 2015

Hann vísir á, at nevndin í SEV hevur stóra virðing fyri teimum mongu, sum hava reist Páls Høll, tí verkætlanin er gjørd av huga. Nevndin í elfelagnum samanber langhylin í Vági við grønu kósina hjá SEV, sum hevur nógvar tøkniligar avbjóðingar við sær, men sum fyrst og fremst skal røkka málinum um 100 prosent grøna elorku í Føroyum í 2030, tí vit lyfta í felag og ganga grønu leiðina av fullum huga.

Øll vóru vælkomin – bæði børn og vaksin – tá ið SEV fríggjadagin 27. november handaði Páls Høll tær 350.000 krónurnar, sum fylgdu við norðurlendsku náttúru- og umhvørvisvirðislønini. Væl av fólki komu at ynskja elfelagnum tillukku við høgt virdu virðislønini og at vera til staðar, meðan SEV læt Páls Høll stórfingnu gávuna á 350.000 krónur.

Aksel V. Johannesen, løgmaður, Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum, Heðin Mortensen, formaður í Kommunufelagnum, og Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður í SEV, hildu røðu. Hákun Djurhuus, stjóri, handaði síðani nevndarformanninum í Páls Høll, John Henrik Holm, 350.000 krónur.

Eisini var tónleikur og kórsangur á skránni, og tey vitjandi fingu gott at eta og drekka. SEV legði dent á, at talan var um eitt fólksligt jólatiltak, har bæði børn og vaksin vóru hjartaliga vælkomin, og tí vitjaði klovnurin, BUBU, eisini børnini.





























# NORÐURLENDSKA NÁTTÚRU- OG UMHVØRVISVIRÐISLØNIN

## – móttøka í Dansifrøi 27. november 2015



















# SEV fekk **grønu virðislønina**

**Elfelagið fekk eitt herðaklapp frá Tórshavnar kommunu, tá kommunan læt SEV grønu virðislønina á Umhvørvisvikuni í høvuðsstaðnum fyrstu viku í mai 2015**

Nevndarformaðurin í SEV, Jákup Suni Lauritsen, var bæði errin og fegin, tá hann leygardagin 2. mai 2015 vegna SEV var biðin at koma oman á Vaglið at taka ímóti grønu virðislønini hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisvikan í høvuðsstaðnum var sett hendan dagin, og í tí sambandi var grøna virðislønin eisini handað.

Sigrun Mohr, forkvinna í náttúru- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar býráð, og næstforkvinnan í nevndini, Elin Lindenskov, handaðu formanninum í SEV virðislønina við hesi grundgeving: *„Grøna virðislønin frá kommununi verður latin einum persóni ella stovni, sum á einhvønn hátt hevur gjørt nakað munagott fyri umhvørvið. Í ár verður grøna virðislønin givin sum eitt herðaklapp til ein stovn fyri ta leiðina, hesin stovnur hevur lagt seg á innan sítt virksemi.*

*Vindmyllulundin í Húsahaga er eitt frambrot, sum kann gera okkum øll stolt, og vónandi fer tað áhaldandi arbeiðið innan hetta økið at føra við sær, at vit verða 100 prosent grøn innan orkunýtslu innan alt ov langa tíð.*

*Í ár hevur Tórshavnar kommuna valt at heiðra SEV við grønu virðislønini sum eitt herðaklapp fyri ta grønu leið, tit sum stovnur hava lagt frameftir. Tann leið, tit hava valt, hevur alstóran týdning fyri okkara umhvørvi og er ein fyrimynd fyri aðrar stovnar og fyritøkur her í Føroyum.“*

–Tað er sera hugaligt at fáa slíkt herðaklapp. Tað gevur okkum enn meira dirvi og treysti at fáa felagsskapin enn longri fram á grønu leiðina, segði Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður í SEV m.a., tá ið hann tók ímóti grønu virðislønini frá Tórshavnar kommunu.

Í 2015 framleiddi SEV 60 prosent av elorkuni úr varandi orkukeldunum vatni og vindi. Árið fyri stavaðu 51 prosent av elorkuni frá varandi orkukeldum, og í 2014 fór elframleiðslan úr varandi orkukeldum sostatt – fyri fyrstu ferð síðani miðskeiðis í sjeytiárunum – upp um elframleiðsluna úr olju, tá talan er um framleiðsluna eftir einum ári.

Bæði í 2014 og 2015 minkaði elframleiðslan úr olju góð 16 prosent um árið.







*Sigrun Mohr, forkvinna í náttúru- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar býráð, ovasta myndin, handaði SEV grønu virðislønina, saman við næstforkvinnuni í nevndini, Elini Lindenskov, mittast myndin. Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, tók ímóti og helt takkartalu vegna SEV, niðasta myndin.*


*Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV, er bjartskygdur um grønu kósina, men hann leggur dent á, at tøknifrøðilig nýbrot áhaldandi verða framd.*

# Grøna kósin hjá SEV er sannførandi

**100 prosent grøn orka á landi í Føroyum í 2030 er eitt skilagott mál hjá SEV og øllum føroyska samfelagnum. Málið kann røkkast, men tað er ein treyt, at tøknifrøðilig nýbrot áhaldandi verða framd, sigur menningarleiðarin í SEV**

Landsstýrið og SEV draga somu línu, tá talan er um at gera Føroyar til eitt grønt land í 2030. Einki annað land í heiminum, sum ikki hevur íbornar og lætt atkomuligar varandi orkukeldur, hevur sett sær so framsøkið mál.

SEV boðaði frá sínum máli um 100 prosent varandi orku á landi í 2030, tá ið vindmyllulundin í Húsahaga varð sett í rakstur 9. oktober 2014. Landsstýrið tók undir við hesum í samgonguskjalinum.

– Grundarlagið undir grønu kósini hjá SEV og Føroya landi er sostatt vorðið sera sterkt. Fortreytin fyri at ganga grønu kósina er við hesum uppfylt, og nú ræður um at leggja alla orku í at halda fram at finna skilabestu tøknifrøðiligu loysnirnar innan varandi orkukeldur í Føroyum, sigur Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.

Grøna kósin hjá SEV er eitt framsøkið mál, og ofta verður spurningurin settur, um hetta yvirhøvur ber til? Terji Nielsen vísir á, at svarið er ikki bara einfalt, men at vit í roynd og veru liggja nógv nærri einum JA enn einum NEI, um svarið skal vera stutt og greitt.

– Varandi orka, veðurlagsbroytingar og samfelagsmenning eru ikki lættisoppaevni, og tí er tað longra svarið, at 100 prosent grøn orka á landi í Føroyum í 2030 er eitt skilagott mál hjá SEV og øllum føroyska samfelagnum at hava. Málið kann røkkast, men tað er ein treyt, at tøknifrøðilig nýbrot áhaldandi verða framd, staðfestir Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.

### Søguliga gongdin

SEV byrjaði sum ein grøn fyritøka, har helmingurin av elframleiðsluni frá 1954, tá ið SEV fór undir veruliga elframleiðslu, og heilt fram til 1974 stavaði frá varandi orkukeldum.

Stóri orkutørvurin mitt í 70'unum, har nýtslan vaks 10-12 prosent um árið, hevði síðani við sær, at oljuriknu verkini framleiddu alt meira elorku, og í 1985 komu 77 prosent av allari elframleiðsluni frá oljuriknu verkunum. Síðan tá hevur framleiðslan á oljuriknu verkunum verið støðugt minkandi til í dag, har 60 prosent av elframleiðsluni koma frá varandi orkukeldum í 2015, sum er tað mesta nakrantíð í nýggjari tíð. Mynd 1 á næstu síðu vísir gongdina.

### Orkutørvurin fram ímóti 2030

„Ringt er at spáa, og serliga um framtíðina" verður ofta tikið til, og tað er eisini galdandi, tá spáast skal um orkutørvin fram ímóti 2030.

Eyðvitað er ein sokallaður vanligur vøkstur í elnýtsluni, sum í høvuðsheitum stavar frá øktum virksemi á landi, men harumframt kemur væntandi ein vøkstur í elnýtsluni, sum stendst av sonevndu elektrifiseringini, har fólk leggja um frá at hita sethús og bygningar við olju til upphiting við elriknum hitapumpum. Eisini fara fólk væntandi at leggja um frá bensin- og dieselbilum til elbilar.

Menningarleiðarin í SEV sigur, at ein sjálvsøgd fyritreyt fyri at fáa fólk at taka undir við elektrifiseringini er, at hin einstaki fær fíggjarligar fyrimunir burtur úr hesi umfatandi samfelagsbroyting. SEV roknar vanliga við einum vøkstri á umleið 2 prosent um árið, og tá elektrifiseringini verður íroknað, kann árligi vøksturin gerast umleið 4,5% árini 2016-2030.

Um støði verður tikið í, at vøksturin í elnýtsluni verður umleið 4,5 prosent um árið, og at øll elframleiðslan í 2030 skal stava frá varandi orku, kann gongdin lýsast í einfaldu framrokningini, sum sæst á mynd 2 á næstu síðu.

Á myndini sæst, at framleiðslan á oljuriknu verkunum javnt verður niðurlagað, meðan alsamt meira varandi orka verður latin inn á elnetið, til Føroyar hava 100 prosent grøna orku á landi í 2030.

### Elframleiðslan

Føroyar eru umgirdar av nógvari varandi orku sum vindi, vatni, sjóvarfalli, aldu og enntá sól um summarið. Hetta eru alt sera ymiskir orkuformar við hvør sínum eyðkenni. Taka vit tær mest óstøðugu orkukeldurnar fyrst, so eru tær vindorkan, sólorkan og alduorkan.

Í Føroyum er sum heild nógvur vindur. Árliga miðalvindferðin er oman fyri 10 m/s, sum er frálíkt til vindorkuframleiðslu. Vindviðurskiftini eru sera skiftandi – bæði tá talan er um vindmegi og ætt. Tað er júst hetta, sum hevur við sær, at framleiðslan úr vindorku er sera óstøðug í Føroyum.




*Mynd 1.*

Sólorkan er eisini skiftandi í Føroyum, og tað sama er galdandi fyri alduorku, sum er tongd at alduni – og tískil at veðri og vindi.

Sostatt er neyðugt at gera ávís átøk fyri at javna óstøðugu framleiðsluna úr vindi, sól og alduorku út á føroyska elnetið, sum altíð skal hava nóg mikið av støðugari elorku fyri at nøkta tørvin hjá samfelagnum.

Hesi átøk kunnu eitt nú vera battarískipanir, ið kunnu javna óstøðugu orkuna frá bæði vindi, sól og aldu út á elnetið. Battarískipanir gerast alsamt vanligari saman við vindi og sól. So hvørt sum hesar battarískipanir gerast størri og størri, samstundis sum kostnaðurin gerst lægri og lægri, verður vindurin saman við battarískipanum ein orkukelda, sum verður løtt at stýra, soleiðis sum vit kenna tað frá vatnorkuni, har einasta fyritreytin er, at nóg mikið av vatni er til taks.

Vatnorkan kann sigast at vera ein støðug orka, tá vatn er í byrgingunum, og tá kann orkan nýtast eftir tørvi. Um einki avfall er, tømast byrgingarnar skjótt, og tí er vatnorkan ikki nóg tryggur máttur. Vatnorkan er ikki altíð tøk við verandi byrgingum – serliga skortar við vatni um summarið.

Sjóvarfalsorkan er skiftandi og knýtt at sjóvarfallinum millum oyggjarnar, ið er tað regluliga rákið, sum er fram við strendurnar. Hóast sjóvarfallið er skiftandi, so ber væl til at rokna út frammanundan, hvussu sjóvarfallið verður. Tað merkir, at langt fram í tíðina ber til at siga rættiliga neyvt, nær orkan er tøk, og nær hon ikki er tøk.

## Orkugoymslur

Nevndu orkukeldur eru allar skiftandi, og tí er umráðandi at hava møguleikan at goyma nakað av orkuni til tíðir, har eingin varandi orka er til taks. Tað er t.d. á sumri, tá eingin vindur og einki regn eru, og aldan er lítil. Samstundis kann vera lítil streymur og mjørki, so hvørki sólorkan ella sjóvarfalsorkan eru tøkar í nóg stóran mun.

Tískil er umráðandi at menna goymlsuskipanir, ið kunnu goyma orku í styttri ella longri tíðarskeið, so at varandi orkan er tøk alt árið, 24 tímar um samdøgrið, soleiðis at 100 prosent støðug elorka kann fáast burtur úr varandi orkukeldunum.

Tað finnast ymiskir møguleikar at goyma orku. Ein møguleiki er at goyma orkuna í einari pumpuskipan, har yvirskot av varandi orku verður brúkt til at pumpa vatn upp í byrgingar, so at henda orkan kann brúkast aftur, tá tørvur er á henni.

Ein annar møguleiki er at gera yvirskot av varandi orku um til vetni (hydrogen, brint), sum kann goymast í tangum til at brúka seinni. Tá brúk er fyri orkuni, kann vetnið gerast aftur til elorku í t.d. brennikyknum, í gassturbinum ella gassmotorum.

Tað er eisini ein møguleiki at goyma orku í hita, og tað hevði ligið væl fyri at goymt yvirskotið av varandi orku í eini goymlsuskipan til fjarhita.

– Tað finnast eisini aðrir hættir at goyma orku, sum vit ikki koma nærri inn á her. Samanumtikið kann sigast, at nóg mikið er til av orku, men at avbjóðingarnar eru fleiri – eitt nú at javna óstøðugu




*Mynd 2.*

orkuna út á netið og goyma hana til seinni nýtslu, staðfestir Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.

## Elnýtslan

Um tað skal eydnast Føroyum at gerast óheftar at oljuni og bert dúva upp á varandi orkukeldur, so er tað ein fyritreyt, at nýtslan í ávísan mun verður lagað eftir framleiðsluni. Hetta kann eitt nú gerast við, at elbilar verða settir at løða, og hitapumpurnar verða settar til, tá mest av varandi orku er til taks. Tað er serliga um náttina, tá orkutørvurin vanliga minkar nógv, sammett við orkutørvin um dagin.

Hugsast kann eisini, at aðrir lutir og húsarhaldstól – so sum vaskimaskinur, uppvaskimaskinur og turkitrumlur – verða sett til um náttina.

Eisini ídnaðurin noyðist í ávísan mun at tillaga sín orkutørv til framleiðsluna úr varandi orku. T.d. kunnu frystiskipanir koyra mest um náttina.

Harumframt er neyðugt at knýta fleiri virkir í PowerHub skipanina hjá SEV, sum kvettir sambandið við ávísar brúkaraeindir hjá stórum elbrúkarum, áðrenn eitt blackout er veruleiki. Stóru brúkararnir merkja kortini einki til, at teir verða settir av netinum eitt lítið bil, meðan SEV setir aðrar framleiðslueindir í gongd fyri at fáa streymveitingina upp aftur á nøktandi støði. Talan er um brúkaraeindir, sum tola eitt streymslit eitt styttri tíðarskeið í nøkur sekund ella fáar minuttir.

Terji Nielsen vísir á, at lítil ivi man vera um, at okkurt skal eggja fólki og ídnaði at leggja nýtsluna um til náttina. Hann metir, at ein hugsandi framferðarháttur er, at munur verður á elprísinum millum dag og nátt, ella tá yvirskot er av varandi orku, tí tað hevði ivaleyst fingið fólk at flutt partar av nýtsluni.

Ein annar háttur er at knýta útvaldar nýtslulutir í sokallaðar SmartGrid-skipanir, har t.d. eitt príssignal frá elfelagnum setir í gongd løðinga av elbilinum, hitapumpuna, vaskimaskinuna o.s.fr. Hetta príssignal hevði verið tongt at nøgdini av varandi orku, soleiðis at tá ovmikið er av orku, vildi skipanin roynt at tendrað hitapumpur, løðingar o.a. og eisini steðgað somu eindum, tá ov lítið av varandi orku er í skipanini.

SmartGrid hevur til endamáls at halda javnvágina í elskipanini, sumstundis sum mest møguligt gagn fæst burtur úr grønu orkuni, at so lítil partur sum gjørligt av grønari orku verður til avlops ella fer til spillis.

Terji Nielsen sigur, at samanumtikið ber til at røkka málinum um 100 prosent grøna elframleiðslu í 2030, tá vit bert hyggja at tøknini og tøknifrøðiligum loysnum.

– Spurningurin um, hvør kostnaðurin verður fyri at røkka málinum, stendur ósvaraður í eina tíð aftrat. Kanningar eru tó í gongd, sum skulu geva okkum eitt betri grundarlag at meta neyvt um tøknifrøðiligar loysnir, íløgur og rakstrarkostnað, upplýsir Terji Nielsen, menningarleiðari í SEV.



*Orkan, sum kemur úr Eiðisvatni, var m.a. við til at økja um vatnorkupartin í 2015.*

# SEV setti nógv met í 2015

**Útbyggingarnar hjá SEV seinnu árini síggjast nú av álvara aftur í hagtølunum í framleiðsluni. 2015 var besta árið nakrantíð á fleiri økjum**



*Sólsetur í Húsahaga, har vindmyllurnar munaðu sera væl í grønu framleiðslutølunum í 2015.*

SEV legði 2015 aftur um seg við besta úrsliti nakrantíð á fleiri økjum, og sostatt setti elfelagið fleiri met í fjør.

SEV hevur ongantíð áður framleitt so nógva elorku yvirhøvur, og elfelagið setti eisini met, tá talan er um framleiðslu burtur úr vatnorku og vindorku. 2015 var fyrsta árið, har nýggju vindmyllurnar í Húsahaga vóru í rakstri í eitt heilt ár.

Vatnorkuverkið á Eiði, har nógvar útbyggingar eru farnar fram seinnu árini, setti met í 2015, og vatnturbinan á elverkinum á Strond hevur ongantíð fyrr framleitt so nógv sum í fjør. Í desember 2015 var elframleiðslan eisini methøg, sammett við øll onnur ár og mánaðir.

Í Vestmannaøkinum var framleiðslan tann hægsta nakrantíð síðani 1982, og oljurikna Sundsverkið framleiddi 46,4 prosent minni í 2015, sammett við 2010, tá ið framleiðslan á Sundsverkinum var tann hægsta nakrantíð.



*Hagtølini, sum verða gjørd upp á høvuðsskrivstovuni hjá SEV við Landavegin 92 í Tórshavn, tala fyri seg – níggju met í 2015.*

*Niðanfyri sæst yvirlit yvir SEV-metini í 2015.*

| Framleiðsla | | Met í 2015 | Samanbering | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| Elframleiðslan tilsamans | ↑ | 314,4 GWt | 305,4 GWt í 2014 | 9,00 GWt meira |
| Framleiðslan úr vindorku | ↑ | 55,8 GWt | 34,5 GWt í 2014 | 21,30 GWt meira |
| Framleiðslan úr vatnorku | ↑ | 133,1 GWt | 120,7 GWt í 2014 | 12,40 GWt meira |
| Grøn orka tilsamans | ↑ | 188,9 GWt | 155,2 GWt í 2014 | 33,70 GWt meira |
| Framleiðslan í des. 2015 | ↑ | 29,76 GWt | 27,62 GWt í 2014 | 2,14 GWt meira |
| Eiðisverkið | ↑ | 68,1 GWt | 61,8 GWt í 2014 | 6,30 GWt meira |
| Vatnturbinan á Strond | ↑ | 4,5 GWt | 3,1 GWt í 2014 | 1,40 GWt meira |
| Vestmannaøkið | ↑ | 54,8 GWt | 54,6 GWt í 1982 | 0,20 GWt meira |
| Sundsverkið | ↓ | 93,9 GWt | 175,1 GWt í 2010 | 81,20 GWt minni |

# Týðandi íløgur og útbyggingar

SEV hevur týðandi íløgur og umfatandi útbyggingar fyri framman. Næstu fimm árini verður bygt út í elskipanini sum heild fyri 1,7 milliardir krónur í samsvari við grønu kósina

Tíðarskeiðið 2016-2020 verða framleiðslan og netið hjá SEV miðvíst styrkt í samsvari við veitingartrygdina, sum er áløgd SEV, og grønu kósina hjá elfelagnum. Íløgurnar í elskipanina hesi fimm árini eru mettar til 1,7 milliardir krónur.

Grøna kósin hevur til endamáls at gera Føroyar óheftar av olju innan 15 ár. Ætlanin er, at øll orka á landi skal koma frá elorku, sum stavar frá varandi orkukeldum – vatni, vindi, sjóvarfalli og sólorku.

Samstundis er talan um eina tilgongd komandi 15 árini, har eitt orkuskifti – ein sonevnd elektrifisering – fer fram í Føroyum. Í hesi tilgongdini er ætlanin, at øll upphiting av húsum og bygningum verður grøn, og at flutningurin á landi fer fram við elriknum akførum.

Meðan grøna kósin næstu árini leiðir føroyska samfelagið fram ímóti alt meira elorku úr varandi orkukeldum, skal oljan vera at taka til t.d. um summarið, tá á stendur at fáa nóg mikið av elorku burtur úr vatni og vindi.

Veitingartrygdin skal haldast alt samdøgrið – alt árið. Havandi í huga veitingartrygdina, grønu kósina, elektrifiseringina og oljuna sum tiltakstrygd, er neyðugt at styrkja elskipanina frameftir, so at hon er trygg, samstundis sum bygt verður út á grønu kósini við vaksandi elorkutørvi.

## Útbyggingar á netinum

Tað hevur alstóran týdning, at øll elskipanin áhaldandi verður dagførd og bygd út, soleiðis at Føroyar altíð hava eina skipan við einum munadyggum neti, sum tekur ímóti elorkuni frá framleiðslueindunum og flytur hana víðari kring alt landið.

Árini 2016-2020 verða 682 milliónir settar av til at útbyggja netpartin.

Í hesum tíðarskeiði skulu nýggjar koplingarstøðir gerast í Vestmanna, Runavík, á Sundi, Innan Eið og á Skarðshjalla fyri tilsamans 223 milliónir krónur.

Íløgur til netútbyggingar annars og sjókaðlar verða mettar til 260 milliónir krónur tilsamans. Tá er ein sjókaðal millum meginøkið og Suðuroynna íroknaður, men fyrivarni verður tikið fyri, at henda verkætlanin skal kannast nærri.

Íløgur í fjaravlisnar málarar, battarískipan í Húsahaga og nýggja stýrisskipan verða mettar til 36 milliónir krónur í fimm ár.

Tørvur er eisini á nýggjum fyrisitingarbygningi, goymslu og verkstaði, har øll umsiting verður savnað á einum staði. Íløgurnar í umsitingina tilsamans tíðarskeiðið 2016-2020 verða mettar til 113 milliónir krónur. Harumframt eru 50 milliónir krónur settar av til ymiskar og óvæntaðar umsitingarútreiðslur hesi árini.

## Grønar íløgur

75 milliónir krónur eru settar av til íløgur í vindorku tíðarskeiðið 2016-2020. Talan er um kanningar og fyrireikingar til at seta upp vindmyllur í Suðuroynni fyri umleið 50 milliónir krónur, so at SEV kann taka lut í einum vindorkuútboði.

Eftir ætlan skulu tvær til tríggjar vindmyllur setast upp í Suðuroynni, sum kunnu setast í rakstur í 2017. Miðað verður eisini eftir, at vindmyllulundin í Suðuroynni kann víðkast við tveimum myllum aftrat eftir tørvi, ella tá tíðin tøkniliga er búgvin til tað.

Harumframt eru 24 milliónir krónur í fíggjarætlanini í 2020 til m.a. vindorkuútbyggingar, tá ætlanin er at fyrireika eina nýggja vindmyllulund, sum verður til støddar sum vindmyllundin í Húsahaga.



Koplingarstøðin í Húsahaga glógvar við sínum ljósspæli í vetrarmyrkrinum.

Vatnorkan er bygd út í stóran mun seinnu árini, og tískil verða bert smærri íløgur gjørdar í hesa orkukeldu næstu fimm árini. Talan er um ábøtur á vatnorkuverkunum fyri tilsamans 24 milliónir krónur í 2016 og 2017.

Nýhugsan og nýbrot eru neyðug fyri at halda grønu kósina, men tað veldst eisini um gongdina innan tøknifrøðiligu menningina innan ymiskar orkukeldur. SEV fylgir væl við í gongdini innan sólorku og sjóvarfall, eins og møguleikarnir fyri pumpuskipan í Vestmannaøkinum verða kannaðir nærri. 64 milliónir krónur eru settar av til hendan partin í 2019 og 2020.

Samanumtikið snýr tað seg um, at grønu útbyggingarnar fara fram, so hvørt búskapurin, nýbrot og tøknifrøðiliga menningin kunnu bera við sær burðardyggar verkætlanir.

## Oljan tiltakstrygd

Tað er umráðandi at halda grønu kósina, men tað er samstundis sera týdningarmikið, at stóru oljuriknu verkini verða dagførd og bygd út í samsvari við, at streymtørvurin økist, og elektrifiseringin fer um landið. Tað snýr seg um veitingatrygdina fyri alt samfelagið.

Oljan verður tiltakstrygd í nógv ár aftrat. Íløgurnar í oljuriknu verkini verða mettar til 858 milliónir krónur árini 2016-2020.

Størsti parturin av hesum íløgunum – umleið 800 milliónir krónur – er settur av til at víðka og útbyggja Sundsverkið, sum við oljuni í nógv ár frameftir fer at hava týðandi leiklutin sum kjarnin í elskipanini, ið skal tryggja støðuga elorku, tá ið t.d. óstøðugar varandi orkukeldur ikki klára at nøkta tørvin á elorku.

Útbyggingarnar á Sundi fevna um at skifta motorar út og seta nýggjar motorar upp, og tí skal nýggj maskinhøll byggjast. Tangagarðurin er víðkaður, og nýtt dagtangahús skal byggjast. Eisini skal 60 kV koplingarstøð byggjast á Sundi.

Vágsverkið, sum er oljurikið verk, er eisini bygt út seinnu árini, og tað verður liðugt í 2016. 18 milliónir krónur eru settar av til íløgurnar á Vágsverkinum í 2016, har maskinhøll er bygd til ein nýggjan motor. Harumframt er verkið bygt út við øðrum bygningum, og tangagarðurin er víðkaður. Nýggj háspenningsútgerð er eisini sett upp á Vágsverkinum. Útbyggingarnar á Vágsverkinum hava kostað tilsamans 94 milliónir krónur.

Aðrar íløgur í oljuriknu verkini árini 2016-2020 verða mettar til umleið 40 milliónir krónur.




Íløgurnar í føroysku elskipanina eru mettar til 1,7 milliardir krónur tíðarskeiðið 2016-2020.

# Grøna føroyska elorkan á arktiskari ráðstevnu

## Umleið 300-400 fólk, sum vóru á The Arctic Circle í Reykjavík, lýddu á, meðan stjórin í SEV greiddi frá avbjóðingunum innan grøna elorku í Føroyum

SEV borðreiddi við grønu kósini á arktisku ráðstevnuni, The Arctic Circle, í Reykjavík leygardagin 17. oktober 2015, har Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, umboðaði elfelagið saman við nevndarformanninum, Jákupi Suna Lauritsen.

Stjórin í SEV var partur av eini longri framløgu úr Føroyum saman við Akseli V. Johannesen, løgmanni, og Sjúrði Skaale, fólkatingsmanni.

1.700 fólk vóru á ráðstevnuni, og eini 300-400 av teimum lýddu á framløguna hjá løgmanni, føroyska fólkatingsmanninum og SEV-stjóranum.

Hákun Djurhuus greiddi frá grønu kósini hjá SEV, sum hevur til endamáls at gera Føroyar óheftar av olju í 2030, tá ætlanin er, at øll orka á landi skal koma frá elorku, sum stavar frá varandi orkukeldum – vatni, vindi, sjóvarfalli og sólorku.

Eisini greiddi SEV-stjórin frá avbjóðingunum í Føroyum at fáa eitt nú nógvan vind, ið er óstøðug orkukelda, inn á føroyska elnetið, sum liggur avbyrgt í Norðuratlantshavi. Føroyar hava ikki møguleika at binda í størri elnet og keypa elorku haðani, soleiðis sum Danmark t.d. kann keypa elorku úr Svøríki og Týsklandi. Sostatt noyðast Føroyar at hava sína egnu backup-skipan.

Føroyska avbjóðingin er at fáa sum mest av óstøðuga vindinum til høldar, samstundis sum elveitingin er støðug, og tað skal m.a. gerast við nýggju battarískipanini í Húsahaga, ið skal javna óstøðuga vindin út á elnetið. Ein onnur avbjóðing hjá Føroyum í elorkuhøpi er, at ov lítið av vatni og vindi er um summarið, og tí verður arbeitt við loysnum, sum kunnu goyma vindorkuna í longri tíð – t.d. pumpuskipan og møguleikanum at gera vetni (brint) úr vatni.

Í báðum førum er talan um at brúka yvirskotsorkuna frá vindinum. Yvirskotsorkan frá vindinum kann brúkast til at pumpa vatn niðan aftur í byrgingarnar, eftir at tað er farið ígjøgnum turbinurnar. Vindorkan kann eisini brúkast til at framleiða vetni úr vatni, sum síðani kann nýtast eftir tørvi.

Íslendski forsetin Ólafur Ragnar Grímsson, sum m.a. vitjaði SEV á Føroyaferð síni í august, var við á arktisku ráðstevnuni. Aðrir leiðarar á The Arctic Circle vóru t.d. franski forsetin Francois Hollande, Prince Albert II úr Monaco, Dagur B. Eggertsson, borgarstjóri í Reykjavík, og Dagfinn Høybråten, aðalskrivari í Norðurlendska Ráðharraráðnum.

The Arctic Circle hevur til endamáls at menna samstarvið í arktiska økinum við samrøðum og at seta framtíðina hjá Arktisk í altjóða miðdepilin. Ráðstevnan varð hildin í Hørpuni í Reykjavík.



*Frá vinstru: Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, Aksel V. Johannesen, løgmaður, og Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður, sum høvdu felags framløgu úr Føroyum á Arctic Circle í Reykjavík.*

ARCTIC CIRCLE

SEV

» Í 2030 skulu Føroyar verða óheftar av olju, tá ætlanin er, at øll orka á landi skal koma frá elorku, sum stavar frá varandi orkukeldum




*Stjórin í SEV greiðir frá grønu kósini, sum skal gera Føroyar óheftar av olju í 2030.*



*Á myndini frá vinstru: Kaj Leo Holm Johannesen, fyrrverandi løgmaður, Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, Ólafur Ragnar Grímsson, forseti Íslands, Bogi Andreasen, næstformaður, og Hákun Djurhuus, stjóri.*



# Íslendski forsetin vitjaði SEV

**Ein elkaðal millum Ísland, Føroyar og meginlandið, gagnnýtsla av vindorku og grøna kósin hjá SEV vóru m.a. á skránni, tá ið íslendski forsetin vitjaði SEV á Føroyaferð síni í august 2015**

Umboð fyri SEV høvdu m.a. høvið at skifta orð um møguleikarnar fyri einum elkaðli millum Ísland og Føroyar, tá íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, vitjaði SEV týsdagin 11. august 2015.

Í hesum sambandi varð eisini umrøtt, hvussu vindorkan kann gagnnýtast betur t.d. við at flyta yvirskotsorkuna ígjøgnum ein kaðal til Íslands.

–Vit viðgjørdu sum heild avbjóðingarnar við óstøðugari vindorku í einum elkervi, og hvussu ein kaðal millum Ísland, Føroyar og evropeiska meginlandið økir møguleikan fyri bíligari vindorku, tí tá kann yvirskotsorkan betur gagnnýtast í fleiri londum, sama hvør mylla framleiðir elorkuna, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

SEV-stjórin legði eisini fram ætlanirnar um 100 prosent grøna orku á landi í Føroyum í 2030, har vindurin og vatnið eru sera týðandi orkukeldur.

Íslendski forsetin hevði undan Føroyaferðini sett fram ynski um at vitja SEV fyri at kunna seg um virksemið hjá elfelagnum, har møguligt samstarv við Ísland, framtíðarætlanir og avbjóðingar hjá SEV og loysnir innan varandi orkukeldur skuldu á dagsskrá.

Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, Bogi Andreasen, næstformaður, og Hákun Djurhuus, stjóri, vóru vertir vegna SEV.



*Nógv fólk savnaðust í Klaksvík, tá SEV tók fyrstu skjóttløðandi løðistøðina til elbilar í Føroyum í nýtslu.*

# Løðistøðir settar upp kring landið

## SEV setti fyrstu skjóttløðandi løðistøðina til elbilar upp í Klaksvík í desember 2015. Í fyrstu atløgu verða løðistøðir settar upp á útvaldum støðum

Løðistøðirnar til elbilar, sum verða settar upp kring landið, eru fyrsta stigið at gera elektrifiseringina ítøkiliga í Føroyum. SEV hevur sett eina millión krónur av til arbeiðið, og tann fyrsta skjóttløðandi løðistøðin varð sett upp í Klaksvík í desember 2015.

Elfelagið setir ætlandi næstu løðistøðina upp í miðbýnum í Havn. Síðani er í fyrstu atløgu ætlanin at seta støðir upp á Flogvøllinum, í Eysturoynni, í Sandoynni og í Suðuroy.

– Fyrsta skjóttløðandi løðistøðin til elbilar, sum varð sett upp í Klaksvík, skumpaði okkum eitt fet nærri elektrifiseringini, har elbilar á føroysku vegunum komandi árini verða ein týðandi partur av tilgongdini at gera Føroyar grønar, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Støðin í Klaksvík hevði við sær, at tað er møguligt at fara t.d. úr Havn við elbili til Klaksvíkar, har bilurin kann løðast eftir stuttari tíð fyri at koyra aftur til Havnar ella aðrar vegir.

Talan er um sonevndar Quick Charge løðistøðir, sum løða elbilin upp á 80 prosent eftir 20 minuttum, og tað er munandi skjótari, enn eldru løðistøðirnar vóru førar fyri.

Stjórin í SEV vísir á alstóra týdningin, at vit lyfta í felag og fáa sett ítøkiligar varðar á grønu leiðini frameftir, soleiðis at fólk í roynd og veru síggja elektrifiseringina breiða seg um landið.



*Frá vinstru: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í orkumálum, og Jógvan Skorheim, borgarstjóri í Klaksvík, lýða á, meðan Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, stutt greiðir áhoyrarunum frá nýggju løðistøðini.*

– Virkni leikluturin, ið landsstýrið hevur átikið sær, tá talan er um grøna orku, og løðistøðin í Klaksvík, har kommunan sjálv í sama viðfangi útvegaði sær tveir elbilar, eru dømi um slíkar varðar á leiðini, staðfestir Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Elfelagið metir løðistøðirnar vera eitt týðandi stig í tilgongdini at elektrifisera Føroyar á grønu kósini frameftir, sum hevur til endamáls at gera Føroyar óheftar av olju. Ætlanin er, at í 2030 skal øll orka á landi koma frá elorku, sum stavar frá varandi orkukeldum – vatni, vindi, sjóvarfalli og sólorku.

# SEV hitar Páls Høll



*Talan er um grønan hugburð, tá SEV hitar Páls Høll og tey vitjandi við avlopshita frá oljurikna Vágsverkinum.*

**SEV fegnast um, at Páls Høll verður hitað við avlopshita frá Vágsverkinum, sum harvið hvílir á einum grønum hugburði, hóast talan er um eitt oljurikið verk**

Páls Høll fær avlopshitan frá Vágsverkinum, og SEV fegnast um samstarvið við langhylin í Vági. Talan er í roynd og veru um ein grønan hugburð í hesi verkætlanini, hóast hitin stavar frá einum oljuriknum verki.

Bæði vatnið í hylinum og hitaskipanin annars eru bundin í eina hitaleiðing frá Vágsverkinum, og sostatt verður oljan á verkinum gagnnýtt nógv betur.

– Tá Páls Høll á henda hátt brúkar avlopshitan, merkir tað, at vit raka tveir fuglar við einum skoti, og grønari fáa vit ikki gjørt tað, tá talan er um olju. Eg gleðist annars um verkætlanina í Vági, har fólk hava lyft í felag og víst, at við einum sterkum vilja ber alt til, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Vágsverkið er útbygt til at nøkta vaksandi elorkutørvin í Suðuroynni, sum veruliga tók dik á seg, tá ið Varðin Pelagic fór undir virksemi á Tvøroyri.





# Undirvísing í Húsahaga

**Eitt nýtt undirvísingarhøli í koplingarstøðini í Húsahaga er karmur um undirvísingina hjá SEV, ið elfelagið metir sum týðandi samfelagsskyldu. Fólk frá elfelagnum undirvísa javnan bæði fólkaskúlanæmingum og lesandi á hægri stigi**





*Bæði fólkaskúlanæmingar, lesandi á hægri stigi og onnur áhugað leita sær undirvísing hjá SEV. Undirvísingin fer fram í hølum, sum eru bygd til endamálið í vindmyllulundini í Húsahaga.*

SEV er fólksins ogn, og SEV kennir tað sum sína skyldu at upplýsa um elframleiðslu, grøna orku og skynsama elnýtslu. Ein liður í hesum setningi er at undirvísa fólkaskúlanæmingum, lesandi á hægri stigi og øðrum bólkum í samfelagnum eftir tørvi.

Undirvísingin, sum áður hevur verið á høvuðsskrivstovuni við Landavegin í Tórshavn, er nú flutt niðan í nýtt fundar- og undirvísingarhøli, ið eru bygt sum partur av nýggju koplingarstøðini í vindmyllulundini í Húsahaga.

Koplingarstøðin, ið flytur streymin frá vindmyllunum út á 60 kV flutningsnetið hjá SEV, hýsir eisini nýggju battarískipanini, sum skal javna vindin frá vindmyllunum í Húshaga út á netið.

Støðin er byggilistarliga lagað eftir landslagnum, og úr undirvísingar- og fundarhølinum ber til at eygleiða vindmyllurnar og grønu elframleiðsluna.

– Undirvísingin fer nú fram í einum sera væl hóskandi umhvørvi, har náttúra, grøn orka og tøkni ganga upp í eina hægri eind, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Hann greiðir frá, at grøna kósin hjá elfelagnum, sum hevur til endamáls at framleiða 100 prosent grøna orku á landi í 2030, snýr seg um rættan hugburð til orkuframleiðslu og orkunýtslu.

– Vit skulu fáa sum mest burtur úr varandi orkukeldunum og nýta orkuna við skili. Við hollari undirvísing er SEV við til at sáa rætta hugburðin í ungu ættarliðini, lærarar og aðrar vegleiðarar, sum dagliga starvast við børnum og ungum, sigur Hákun Djurhuus, stjóri.

Talan er um undirvísing á øllum útbúgvingarstigum, har tørvur er á vitanini hjá elfelagnum.

SEV bjóðar øllum 9. flokkum í landinum ein undirvísingardag, har lærarar og næmingar eitt nú fáa vitan um grøna elframleiðslu og skilagóða elnýtslu. SEV fær eisini javnan fyrispurningar frá miðnámsskúlum og læristovnum á hægri stigi, sum sóknast eftir ítøkiligari vitan um elorkuøkið.

– Rættur hugburður og holl vitan skulu bera okkum fram á grønu kósini, og tí tekur SEV undirvísingarleiklutin í størsta álvara. Vit hava røttu karmarnar og dugnalig starvsfólk, so eg meti fyritreytirnar fyri hollari undirvísing eru til staðar, staðfestir Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

Ymiskir serfrøðingar hjá SEV undirvísa í Húsahaga, alt eftir tørvinum hjá teimum, sum søkja sær vitan hjá elfelagnum.

# Gravgangur eftir størvum í SEV

**Útbyggingar og nýggjar uppgávur á grønu kósini hava havt við sær, at SEV seinastu tvey árini hevur sett 40 fólk í starv. Trivnaðurin er góður, men nýggjar tíðir broyta so líðandi virkismentanina í 70 ára gamla elfelagnum**





*Áhugin at starvast hjá SEV er stórur, og alsamt nýggjar uppgávur taka seg upp á grønu kósini.*

Stórur áhugi er fyri størvum í SEV, sum hevur sett 40 fólk í starv seinastu tvey árini.

Í hesum hópinum eru fólk, sum koma í nýggj størv, og fólk, ið verða sett fyri onnur, sum fara frá fyri aldur ella leita sær aðrar leiðir. Millum tey 40 fólkini eru eisini lærlingar, fólk í starvsvenjing, fólk í vardum starvi og fólk, sum koma inn í elfelagið ígjøgnum vikarskipanina hjá ALS.

Starvsfólkahópurin í elfelagnum broytist so líðandi, tí nýggjar uppgávur taka seg upp á grønu kósini hjá elfelagnum. Starvsinnihaldið er í fleiri førum broytt í mun til nýggj arbeiðsøki innan grøna orku og aðrar útbyggingar, og tí er ofta tørvur á nýggjum førleikum.

– Broytingar í starvsfólkahópinum hava eisini við sær, at virkismentanin í fyritøkuni broytist við tíðini, tí nýggju starvsfólkini hava sjálvandi aðrar royndir í skjáttuni, sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari í SEV.

Bergtóra Høgnadóttir vísir á, at tað setir sín dám á fyritøkuna, tá sløk 30 prosent av starvsfólkunum eru nýggj í starvi hjá SEV.

– Tá vit seta fólk, royna vit at hugsa fjølbroytni bæði í mun til førleikar, royndir, útbúgving, aldur, kyn og persónmenskur, greiðir Bergtóra Høgnadóttir frá.

HR-leiðarin leggur dent á, at broytingarnar í starvshópinum og virkismentanini fara fram javnt og samt. Fyritøkan hevur brúk fyri nýggjum kreftum, men hon hevur sanniliga eisini brúk fyri teimum starvsfólkum, sum hava ment fyritøkuna til tað, hon er í dag. Drúgvar royndir, ein grundfestur arbeiðssamleiki og eldhugi eyðkenna ikki minst tey, sum hava starvast hjá SEV í nógv ár.

– Í einari so samansettari, fjølbroyttari og samfelagsliga týðandi fyritøku sum SEV er tørvur á einari skipaðari tilgongd inn í nýggjar tíðir, har nýggju starvsfólkini í einum jaligum anda byggja á herðarnar á teimum, sum gingu undan, staðfestir Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari.

Miðalstarvsaldurin í elfelagnum er framvegis høgur, hóast starvsfólkahópurin broytist. Fleiri ferðir árliga eru 25 ára starvsdagar, og miðalaldurin er 49,8 ár í starvsfólkahópinum, sum telur 145 fólk í føstum starvi.

Human Resource, stytt HR, er virkisøkið, sum snýr seg um menniskjansliga tilfeingið í fyritøkuni. Fremsta uppgávan hjá HR-deildini í SEV er áhaldandi at virka fyri, at starvsfólkini trívast, støðast og mennast.

– HR-deildin kýtir seg saman við leiðslu, leiðarum og øllum starvsfólkunum at røkka hesum málum. Fyrsta nøgdisemiskanningin í SEV, sum varð gjørd í 2013, vísti, at starvsfólkini í stóran mun eru serstakliga væl nøgd við arbeiðsplássið, sigur Bergtóra Høgnadóttir.

Hon metir, at broytingarnar í starvsfólkahópinum og virkseminum hjá SEV liggja í einari sunnari tilgongd, sum m.a. er kjølfest í virðisorðunum *Samstarv*, *Eldhugi* og *Virðing*.



# Góð úrslit
## av miðvísum HR-arbeiði

**Miðvísa HR-arbeiðið, sum SEV setti í verk fyri trimum árum síðani, gagnar bæði elfelagnum og starvsfólkahópinum. Nøgdsemiskanningar vísa, at trivnaðurin í SEV er sera góður**



*Tvær nøgdsemiskanningar í 2013 og 2015 vísa, at starvsfólkini trívast sera væl í SEV.*

Leiðslan í SEV avgjørdi fyri trimum árum síðani, at HR-virkisøkið skuldi raðfestast frammarlaga, og hetta sæst væl aftur í úrslitum hjá bæði fyritøku og starvsfólkahópi. Ein nøgdsemiskanning, sum var gjørd við árslok 2015, vísir, at trivnaðurin er sera góður, og at trivnaðurin er vorðin enn betri, tá sammett verður við eina kanning frá 2013, ið eisini vísti góðan trivnað.

SEV hevur rokkið sera góðum úrslitum seinnu árini á fleiri økjum, og eitt nú var 2015 eitt framúr úrslitagott ár, har elframleiðslan var 60 prosent grøn, og har elfelagið fekk tvær grønar virðislønir – náttúru- og umhvørvisvirðislønina hjá Norðurlandaráðnum og Grønu virðislønina hjá Tórshavnar kommunu.

– Slík úrslit fáast ikki uttan serstakliga dugnalig starvsfólk og eina væl skipaða HR-strategi, sum áhaldandi setir starvsfólkamenning, professjonella rekrutering, eitt innihaldsríkt starv og greið mál í hásæti. Alt hetta er ein týðandi partur av grundarlagnum undir einari nútímans fyritøku, ið vil røkka góðum úrslitum, sigur Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingini hjá SEV.

Hann vísir á, at tað kann vera ilt at siga, í hvønn mun tað er HR-strategiin, kósin hjá SEV ella onnur viðurskifti, sum hava størstan týdning í arbeiðslívinum – men ivaleyst eru nógv ymisk viðurskifti, sum ávirka arbeiðsdagin.

– Tú kanst siga, at strategisku málini eru tann parturin, ið skal geva starvsfólkunum eitt spennandi arbeiðslív, og at HR er tað virkisøkið, sum skal menna og hjálpa starvsfólkunum at røkka settum málum, eins og HR eisini skal lofta starvsfólkunum í trongum støðum og truplum tíðum, greiðir Bogi Bendtsen frá.

Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari, tekur undir við deildarstjóranum og leggur aftrat, at eitt framkomið arbeiðspláss hevur tað sum sjálvsagdan part av sínum virksemi, at starvsfólkini trívast og mennast.

– Framkomna arbeiðsplássið kýtir seg, so starvsfólk uppliva arbeiðsgleði, nøktandi og innihaldsríkar avbjóðingar í einum trygg-um starvi. Og tað loysir seg, tí at gransking vísir, at starvsfólk, sum trívast, hava færri sjúkradagar, avrika meiri og gera færri villur, staðfestir Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari í SEV.

## Góður trivnaður

Bæði HR-leiðarin og deildarstjórin fyri fyrisitingini kunnu av røttum siga, at trivnaðurin er sera góður á SEV. Bergtóra Høgnadóttir vísir á, at hetta er heildarmyndin, eftir at elfelagið hevur lagt stóran dent á HR og gjørt tvær nøgdsemiskanningar í elfelagnum. Tvey ár vóru millum kanningarnar, sum vóru gjørdar við árslok 2013 og 2015.

Sum heild bar til at staðfesta framgongd í kanningini í 2015 sammett við kanningina í 2013, ið eisini var mett sum eitt gott



*Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingini, og Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari, eru tilvitað um, at ein greið HR-strategi hevur stóran týdning fyri menningina og trivnaðin í SEV.*

kanningarúrslit. Í báðum kanningum svaraðu ávikavist 107 og 113 fólk.

Meginparturin av starvsfólkunum vístu í kanningum á, at tey hava eitt innihaldsríkt arbeiði, at tey kenna arbeiðsgleði, og at tey eru errin av at starvast hjá SEV. Álitið á stjóra og leiðslu er sera stórt í báðum kanningum, eins og starvsfólkini eisini hava stórt álit sínámillum.

Mett verður, at tá 70 prosent ella fleiri av teimum spurdu svara einum spurningi jaliga, so er talan um gott úrslit. Í kanningini frá 2015 vóru 44 spurningar, og í 32 av teimum spurningunum lógu jaligu svarini oman fyri 70 prosent – í fleiri førum eisini oman fyri bæði 80 og 90 prosent.

Jaligu svarini eru tey svar, har tey spurdu siga seg „púra samd" ella „samd" við spurninginum. Hinir møguleikarnir at svara eru: „partvís samd/ur", „partvís ósamd/ur", „ósamd/ur", „púra ósamd/ur" og „veit ikki".

SEV hevur eina nullhugsjón, tá talan er um strongd, happing og trygd. Kanningarnar vísa, at á hesum økjum eru málini ikki rokkin.

– Vit leggja áherðslu á hesi øki, sum vit fara at leggja serliga stóran dent á komandi árini. Harumframt skulu virkisøki, har ein nullhugsjón er galdandi, áhaldandi røkjast til fulnar, sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari.

Niðanfyri verða nøgdsemiskanningarnar 2013 og 2015 sammettar eftir útvaldum, týdningarmiklum spurningum og svarum.

| Brot úr nøgdsemiskanningunum | 2013 | 2015 | Broyting | |
|---|---|---|---|---|
| | *Púra samd/ur og samd/ur* | *Púra samd/ur og samd/ur* | | |
| Eg havi álit á stjóranum | 70,8% | 85,7% | +14,9 %-stig | ↑ |
| Eg havi álit á ovastu leiðsluni | 64,2% | 81,3% | +17,1 %-stig | ↑ |
| Eg taki undir við kósini | 51,4% | 74,1% | +22,7 %-stig | ↑ |
| Eg viðmæli øðrum starv hjá SEV | 70,8% | 94,6% | +23,8 %-stig | ↑ |
| Eg eri errin at arbeiða hjá SEV | 70,8% | 96,4% | +25,6 %-stig | ↑ |
| Eg trívist í mínum starvi | 76,4% | 91,1% | +14,7 %-stig | ↑ |
| Eg fái kunning um týðandi viðurskifti | 42,5% | 91,1% | +48,6 %-stig | ↑ |
| Eg havi eitt innihaldsríkt arbeiði | 77,1% | 91,1% | +14,0 %-stig | ↑ |
| Vit samstarva væl á deildini | 77,9% | 89,3% | +11,4 %-stig | ↑ |

# Starvsfólkahópurin

Í 2015 fingu 213 fólk útgjald gjøgnum lønarskipanina hjá SEV. Í hesum talinum eru 8 fólk, sum hava fingið útgjald í sambandi við nevndararbeiði, 3 málaraavlesarar, 5 tænastumannaeftirlønir, 52 hjálparfólk, avloysarar og fólk í tíðaravmarkaðum starvi umframt 145 fólk í føstum starvi hjá SEV.







## Býtið av starvsfólkunum

Lagkøkumyndin vísir, hvussu tey 145 starvsfólkini í føstum starvi við árslok 2015 eru býtt út á eindirnar.




### Starvsaldur

Miðalstarvsaldurin er 14 ár. Í 2015 høvdu 42 fólk ella 29 prosent av starvsfólkunum starvast hjá SEV í 25 ár ella meira. Í 2014 vóru tey 46 fólk svarandi til 33 prosent.




### Aldur

Miðalaldurin í starvsfólkahópinum er lækkandi. Í 2012 og 2013 var miðalaldurin góð 51 ár og í 2014 sløk 50 ár. Í 2015 var miðalaldurin 49,8 ár.

Stabbamyndin vísir, at ein lítil minking er í starvsfólkabólkinum 60-69 ár, og at vøkstur er í øllum hinum bólkunum. Vøksturin er størstur í aldursbólkinum 50-59 ár.

Við árslok 2015 vóru 28 starvsfólk 60 ár og eldri.

# Heilsa, trygd og umhvørvi

## Heilsu-, Trygdar- og Umhvøvispolitikkur (HTU)

SEV orðaði hin 17. desember 2008 Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikk (HTU), ið er alment tøkur á heimasíðuni hjá SEV, og sum hongur á øllum arbeiðsstøðunum.

## Trygd

SEV er eitt framkomið virki, sum raðfestir trygd og arbeiðsumhvørvi frammarlaga til gagns fyri okkum øll.

## Trygdararbeiði

Í 2015 hevur trygdararbeiðið hjá SEV eitt nú snúð seg um at gera eina tilbúgvingarætlan fyri álvarsamar vanlukkur ella skelkandi hendingar. Eisini hevur verið arbeitt við at fáa nýggj arbeiðs- og trygdarklæðir til starvsfólkini hjá SEV.

Mynd 1 niðanfyri vísir trygdarskipanina hjá SEV.

## Persónskaðar

Hóast SEV arbeiðir skipað við trygdini, og visjónin er, at eingir skaðar henda, slepst ikki heilt undan skaðum. Á mynd 2 á næstu síðu sæst tal av persónskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin. Í 2015 var eingin persónskaði fráboðaður Arbeiðseftirlitinum.

## Umhvørvið

Mynd 3 á næstu síðu sýnir høvuðsárinini, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið í sambandi við elframleiðslu. Vinstrumegin á myndini sæst, hvørji evni verða nýtt í framleiðsluni. Ovast og niðast á myndini sæst, hvørji evni ávikavist verða útleidd til luft og sjógv í framleiðsluni. Á høgru síðu á mynd 3 sæst, hvørji evni fáast burtur úr framleiðsluni – t.d. kann nevnast el og fjarhiti.

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór oljurikin verk – Strond, Sund og Vágsverkið. SEV hevur seks vatnorkuverk – Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

SEV hevur haraftrat seks vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni og 13 vindmyllur í Húsahaga oman fyri Tórshavn.




*Mynd 1. Trygdarskipanini hjá SEV.*




*Mynd 2. Tal av persónskaðum, ið hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin, og sum eru fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.*




*Mynd 3. Yvirlit yvir tey høvuðsárin, virksemið hjá SEV hevur á umhvørvið.*

| Galdandi umhvørvisgóðkenningar: | Sett í gildi / Valid as of: |
|---|---|
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá SEV í Neshaga | 14.05.04 |
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sundi | 28.04.11 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllunum hjá Elfelagnum SEV í Neshaga | 13.01.12 |
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági | 18.11.15 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá Elfelagnum SEV í Húsahaga | 16.01.13 |

## Umhvørvisgóðkenningar

Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til Løgtingslóg um umhvørvisvernd, skulu hava eina umhvørvisgóðkenning. Tey virkir ella útbúnaðir, talan er um hjá SEV, eru Sundsverkið, Vágsverkið og vindmyllurnar í Neshaga og Húsahaga. Í 2015 fekk SEV nýggja umhvørvisgóðkenning á Vágsverkinum í sambandi við útbyggingina av verkinum. Talvan omanfyri vísir umhvørvisgóðkenningarnar hjá SEV.

## Útlát til luftina

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av $CO_2$-útlátinum frá virkseminum hjá SEV stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Harnæst stavar $CO_2$-útlátið frá oljunýtsluni til upphiting av bæði bygningum og motorum umframt oljunýtslu til flutning við arbeiðsakførum hjá SEV. Mynd 4 vinstrumegin vísir, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ var í 2015. Mynd 5 niðanfyri vísir, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ hevur verið árini 2008 til og við 2015.




*Mynd 4. Nøgdin av $CO_2$-útláti í 2015.*




*Mynd 5. Útlátið av $CO_2$, elframleiðsan og specifik $CO_2$ frá 2008-2015.*

## Fjarhiti

Í sambandi við elframleiðslu verður vanliga nógvur hiti leiddur út gjøgnum skorsteinarnar. Á Sundsverkinum verður hesin hitin í staðin fyri nýttur á staðnum til millum annað upphiting av tungolju.

Um ársskiftið 2008/2009 var orka frá Sundsverkinum knýtt í fjarhitaskipanina í Hoyvík. Í dag eru 999 brúkarar knýttir at Fjarhitafelagnum. Á mynd 6 høgrumegin sæst, hvussu nógvan fjarhita SEV hevur latið seinastu árini.

SEV læt Fjarhitafelagnum 5,05 GWt í 2015. Tað er munandi minni enn fleiri av undanfarnu árunum, sum myndin omanfyri vísir. Ein orsøk til minkingina er, at Sundsverkið framleiddi minni í fjør, tí SEV framleiddi væl meira úr varandi orkukeldum í 2015.




*Mynd 6. Yvirlit yvir, hvussu nógva orku SEV hevur latið Fjarhitafelagnum í MWt.*

## Burturkast

Gjøgnum virksemið hjá SEV verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av tí framleidda burturkastinum verður tyrvt og endurnýtt, og eisini verður burturkast sent til serviðgerð – eitt nú kemikaliirestir.

Av burturkasti til endurnýtslu er størsti parturin spillolja, sum verður latin IRF. Eisini er jarn og metal ein stórur partur.

Á mynd 7 niðanfyri sæst m.a., at nøgdin av serviðgjørdum burturkasti øktist munandi í 2015. Hetta stendst av, at SEV í 2015 beindi burtur nógvar gamlar akkumulatorar, tá ruddað var upp á goymsluni á Strond.

Á mynd 8 á næstu síðu sæst yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2010 til og við 2015. SEV skilti í 2015 meira papp og pappír sundur frá øðrum burturkasti sammett við undanfarin ár.




*Mynd 7. Yvirlit yvir burturkast frá 2010 til og við 2015.*




*Mynd 8. Yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2010 til og við 2015.*

# Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2015

# Elfelagið SEV
# Ársfrásøgn fyri 2015

## Innihald


Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 50
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 51
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . . . 52
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 53
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 54
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 68
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember . . . . . . . . 72
Fíggjarstøða 31. desember . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 76
Rakstrarbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 80


### Felagið

Elfelagið SEV
Fyrisiting:
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn
Telefon: 346800
Heimasíða: www.sev.fo
Teldupostur: sev@sev.fo
Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

### Nevnd

Jákup Suni Lauritsen, formaður (COB)
Bogi Andreasen, næstformaður
Karl A. Olsen
Karl M. Rasmussen
Steinbjørn O. Jacobsen
Bødvar Hjartvarsson
Frits Poulsen

### Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri (CEO)
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisiting (CFO)
Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri net (CTO)
Anders Nedergaard-Hansen, deildarstjóri fyri framleiðslu (COO)

### Grannskoðan

P/F Januar
Løggilt grannskoðanarvirki
Hoyvíksvegur 5, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgn felagsins fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2015 hjá Elfelagnum SEV.

Ársrfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2015.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 8. apríl 2016

### Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

### Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

### Nevnd

*Jákup Suni Lauritsen*
*Formaður*

*Bogi Andreasen*
*Næstformaður*

*Karl A. Olsen*

*Karl M. Rasmussen*

*Steinbjørn O. Jacobsen*

*Bødvar Hjartvarsson*

*Frits Poulsen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til kapitaleigararnar í Elfelagnum SEV

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapurin hjá Elfelagnum SEV fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2015 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymi, virkisbýtisuppgerð, rakstrarbýti og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar 31. desember 2015 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava sambært ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað sum ískoyti til grannskoðanina av ársroknskapinum. Útfrá hesum grundarlagi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 8. apríl 2016

**P/F Januar**
Løggilt grannskoðanarvirki

*Hans Laksá*
*Statsaut. revisor*

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í tkr. | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Nettosøla | 421.952 | 410.551 | 384.625 | 355.787 | 316.393 | 278.263 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 221.483 | 155.573 | 103.914 | 76.041 | 36.310 | 14.638 |
| Rakstrarúrslit | 127.897 | 78.376 | 33.877 | 8.265 | -24.803 | -36.283 |
| Fíggjarligir postar, netto | -24.830 | -20.613 | -22.011 | -20.535 | -14.454 | -10.139 |
| Ársúrslit | 103.067 | 57.763 | 11.866 | -12.270 | -39.257 | -46.422 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.960.373 | 1.742.038 | 1.475.209 | 1.411.000 | 1.286.519 | 1.233.175 |
| Tøkur peningur | 221.889 | 131.459 | 66.593 | 87.384 | 29.299 | 42.144 |
| Eginogn | 1.042.921 | 939.854 | 882.091 | 870.225 | 882.495 | 921.752 |
| Langfreistað skuld | 830.000 | 691.411 | 510.254 | 461.583 | 299.007 | 217.890 |
| **Lyklatøl *)** | | | | | | |
| Renting av eginogn | 10,4% | 6,3 % | 1,4 % | -1,4 % | -4,4 % | -4,9 % |
| Ognaravkast | 6,9% | 4,9 % | 2,3 % | -0,6 % | -2,0 % | -3,0 % |
| Skuld netto | 2,8 | 3,6 | 4,3 | 4,9 | 7,4 | 12,0 |
| Ognarumferð | 0,22 | 0,24 | 0,26 | 0,25 | 0,25 | 0,23 |
| Eginognarpartur | 53,2% | 54,0 % | 59,8 % | 61,7 % | 68,6 % | 74,7 % |

## Útrokning av lyklatølum

Renting av eginogn $= \frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$

Ognaravkast $= \frac{\text{Úrslit av primerum rakstri x 100}}{\text{Miðalvirði av aktivum}}$

Nettoskuld/EBITDA $= \frac{\text{Nettoskuld (skuld – tøkur peningur)}}{\text{EBITDA}}$

Ognarumferð $= \frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

Eginognarpartur $= \frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi. Eftir Elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir heftu fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum yvir fyri starvsfólkunum. Inniverandi frágreiðing fevnir um samlaða virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2015 - 31. desember 2015.

## Staðfesta fíggjargongdin í mun til ætlað og framroknað 2015

Til eykaaðalfundin á heysti skal felagið mótvegis eigarunum sambært viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk. 12b kunna um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin, sum var tann 24. apríl 2015. Kunningin var gjørd á eykaaðalfundinum tann 27. november 2015, og víst verður eisini til nærri kunning í frágreiðing til fundin um fíggjargongdina 2015 á heimasíðu felagsins www.sev.fo. Kunningin bygdi á staðfest tøl við endan av september umframt metingar og ætlanir fyri restina av árinum.

Í talvu 1 er eisini víst frávik í mun til roknskapin og upprunaligu ætlanina og í mun til roknskapin og framroknaða úrslitið.

## Nærri lýsing av frávikunum millum ætlan, framroknað og roknskap.

Enn er ikki øll avrokningarskipanin mótvegis kundunum umløgd til digitalar málarar, og tí er trupult at siga gjøgnum árið, hvørjir av hesum kundum fara at fáa eina hægri ella lægri elnýtslu, tí elmálararnir hjá kundum verða lisnir av einaferð um árið. Hetta viðførir, at felagið ikki mánaðarliga nágreiniliga kann gera upp í mun til framleiðsluna, hvørjir kundar ella kundabólkar skulu tilskrivast øktu elnýtsluni. At gera neyvar framrokningar fer í størri mun enn í dag at lata seg gera, tí SEV hevur skift stórt sæð allar teir gomlu málararnar út við framkomnar digitalar málarar, sum sjálvvirkandi kunnu avlesast av kundatænastuni hjá felagnum. Hinvegin vantar SEV at íbinda hesar í digitalu málaraskipanina, men arbeiðið væntast liðugt í 2016.

*Talva 1*

| Frávik millum ætlan, framroknað og roknskap í mió. kr. | Roknskapur 2012 | Roknskapur 2013 | Roknskapur 2014 | Ætlan 2015 | Uppgjørt pr. 30. sept. 2015 | Framroknað 2015 | Roknskapur 2015 | Frávik millum ætlan og roknskap 2015 | Frávik millum framroknað og roknskap 2015 | Frávik millum roknskap 2014 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 355,8 | 384,6 | 410,6 | 407,7 | 310,1 | 424,7 | 422,0 | 14,3 | -2,7 | 11,4 |
| Oljuútreiðslur | 166 | 167,9 | 141,5 | 109,1 | 71,8 | 93,2 | 86,2 | -22,9 | -7,0 | -55,3 |
| Tilfar og tænastur | 53,5 | 54,1 | 49,8 | 68,9 | 36,6 | 54,1 | 49,9 | -19,0 | -4,2 | 0,1 |
| Lønir | 60,2 | 58,7 | 63,6 | 71,3 | 48,7 | 68,1 | 64,3 | -7,0 | -3,8 | 0,7 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **279,7** | **280,7** | **255,0** | **249,3** | **157,1** | **215,4** | **200,5** | **-48,8** | **-14,9** | **-54,5** |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **76,0** | **103,9** | **155,6** | **158,5** | **153,0** | **209,3** | **221,5** | **63,0** | **12,2** | **65,9** |
| Avskrivingar | 67,8 | 70,0 | 77,2 | 97,5 | 75,1 | 86,9 | 93,6 | -3,9 | 6,7 | 16,4 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **8,3** | **33,9** | **78,4** | **60,9** | **77,8** | **122,4** | **127,9** | **67,0** | **5,5** | **49,5** |
| Rentuútreiðslur netto | 20,5 | 22,0 | 20,6 | 23,8 | 18,5 | 24,4 | 24,8 | 1,0 | 0,4 | 4,2 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-12,3** | **11,9** | **57,8** | **37,2** | **59,3** | **98,1** | **103,1** | **65,9** | **5,0** | **45,3** |

*Talva 2*

| Uppgerð yvir inntøkur frá streymsølu og føstum gjaldi frá kundabólkum í mió. kr. | Roknskapur 2014 | Ætlan 2015 | Framroknað 2015 | Roknskapur 2015 | Frávik millum ætlan og roknskap 2015 | | Frávik millum roknskap 2014 og 2015 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tilsamans | Tilsamans | Tilsamans | Tilsamans | Í krónum | % | Í krónum | % |
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 37,5 | 35,1 | 39,0 | 44,3 | 9,2 | 26,2 | 6,8 | 18,1 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 90,2 | 87,8 | 92,9 | 92,4 | 4,6 | 5,2 | 2,2 | 2,4 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 35,6 | 33,1 | 36,3 | 32,6 | -0,5 | -1,5 | -3,0 | -8,4 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 34,7 | 33,5 | 34,8 | 33,8 | 0,3 | 0,9 | -0,9 | -2,6 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 0,0 | 5,5 | 5,4 | 5,5 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Almennar og privatar tænastur, kirkjur og samkomur v. m. | 54,4 | 54,2 | 56,9 | 54,7 | 0,5 | 0,9 | 0,3 | 0,6 |
| Gøtuljós | 10,4 | 11,1 | 10,8 | 10,4 | -0,7 | -6,3 | 0,0 | 0,0 |
| Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 127,4 | 132,4 | 131,0 | 127,5 | -4,9 | -3,7 | 0,1 | 0,1 |
| **Tilsamans** | **395,7** | **392,7** | **407,1** | **401,2** | **8,5** | **2,2** | **5,5** | **1,4** |

Nettoumsetningurin bleiv framroknaður til 424,7 mió. kr., meðan hesin var 422,0 mió. kr. ella 2,7 mió. kr. lægri. Samlaða sølan í 2015 frá streymgjaldi og føstum gjaldi bleiv framroknað til 407,1 mió. kr., meðan henda gjørdist 401,2 mió. kr., sum er 5,9 mió. kr. lægri enn framroknað. Hetta kemst serliga av, at framroknað var við eini framgongd í søluni til privatkundar, men tá avtorðnaði vísti tað seg, at felagið hevði eina afturgongd í søluni av el til privatkundar, meðan felagið hevði eina meirframgongd í søluni til vinnukundar.

Felagið ætlaði upprunaliga við einum úrsliti í 2015 upp á 37,2 mió. kr., meðan endaliga úrslitið fyri 2015 gjørdist 103,1 mió. kr. ella ein framgongd í mun til ætlan upp á 65,9 mió. kr. Felagið framroknaði úrslitið at gerast 98,1 mió. kr., meðan úrslitið gjørdist 103,1, ella 5,0 mió. kr. betur enn framroknað. Felagið hevur tí eina munandi størri framgongd enn upprunaliga ætlað og eisini enn framroknað.

Orsøkin til hesa framgongd er grundað á framgongd á fleiri økjum. Nettoumsetningurin er 14,3 mió. kr. størri enn ætlað grundað á størri sølu, oljuútreiðslurnar eru 22,9 mió. kr. lægri grundað á lægri oljunýslu og lægri oljuprísir, lægri kostnað til tilfar og tænastur upp á 19,0 mió. kr. eins og lønarkostnaðurin er lægri enn ætlað við 7,0 mió. kr. grundað á javnan í eftirlønum, og størv sum ætlandi skuldu setast við byrjanina av árinum, ikki vóru sett fyrr enn miskeiðis í árinum og annars lægri lønarkostnað enn ætlað.

Harumframt eru avskrivingarnar 3,9 mió. kr. lægri enn ætlað, har høvuðsorsøkin er lægri íløgur enn ætlað. Samanumtikið kann sigast, at framgongdin fyri úrslitið upp á 65,9 mió. kr. í mun til ætlað er grundað á fýra høvuðsbólkar í rakstrinum.

Talva 2 vísir framroknaðu og staðfestu inntøkur felagsins frá streymsølu og fasta gjaldinum í mió. kr. í teimum ymisku kunda-bólkunum.

Hartil koma inntøkur frá íbindingargjøldum og øðrum inntøkum. Ætlað var við 17,8 mió. kr. í 2015, meðan framroknað var við 20,4 mió. kr. Inntøkan av hesum posti í 2015 gjørdist 22,9 mió. kr., sum er betur enn ætlað og framroknað. Íbindingargjøld og aðrar inntøkur fyri 2014 vóru 17,4 mió. kr. Sostatt gjørdist henda inntøka 4,0 mió. kr. hægri í 2015 enn í 2014.

*Talva 3*

| Tons tungolja | 2013 | 2014 | 2015 | 2015 Ætlan | 2015 Framroknað | Frávik millum ætlan og roknskap 2015 | Frávik millum framroknað og roknskap 2015 | Frávik millum roknskapin 2014 og 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tungolja / Heavy oil | *36.893* | *30.880* | *25.738* | 27.781 | 27.570 | -2.043 | -1.832 | -5.142 |

Inntøkur felagsins frá steymgjaldi og fasta gjaldinum í 2015 vóru tilsamans 401,2 mió. kr. mótvegis inntøkunum í 2014, sum vóru 395,7 mió. kr. Hesar gjørdist sostatt 5,5 mió. kr. hægri í 2015. Verða staðfestu inntøkurnar samanlíknaðar við inntøkurnar í ætlan felagsins fyri 2015, har inntøkurnar vóru ætlaðar til 392,7 mió. kr., so gjørdist hesar 8,5 mió. kr. hægri enn ætlað.

Framgongd er í inntøkum felagsins upp á 5,5 mió. kr. frá kWt-gjaldinum og fasta gjaldinum í 2015 í mun til 2014. Henda framgongd er serliga frá kundabólkinum landbúnaður og fiskivinna. Fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna eru í netroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Oljuútreiðslurnar vórðu framroknaðar til 93,2 mió. kr., meðan endaligu útreiðslurnar vóru 86,2 mió. kr., sum eru 7,0 mió. kr. lægri. Størsta orsøkin til lægru útreiðslurnar er ein lægri oljunýtsla enn framroknað og hægri valutakursvinningur av dollarum á goymslu við ársenda.

Felagið nýtti í 2015 25.738 tons tungolju í framleiðsluni, meðan tilsvarandi nýtsla í 2014 var 30.880 tons svarandi til eina minni nýtslu upp á 5.142 tons. Ætlað var við eini nýtslu upp á 27.781 tons tungolju svarandi til eina minni nýtslu upp á 2.043 tons. Í framleiðsluroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo, er oljunýtsla og prísir meiri sundurgreinað og viðmerkt.

Kostnaðurin fyri tilfar og tænastuveitingar varð framroknaður til 54,1 mió. kr., meðan hesin var 49,9 mió. kr., sum er 4,2 mió. kr. lægri. Neyva og støðuga stýringin av rakstrinum á tilfar og tænastusíðuni bleiv fasthildin, eins og undanfarna ár. Framroknað var, at framleiðsluvirkini fóru at hava eina nýtslu upp á 22,0 mió. kr., meðan kostnaðurin var 21,3 mió. kr. ella 0,7 mió. kr. lægri. Netvirksemið bleiv framroknað til 12,6 mió. kr., og kostnaðurin var 11,8 mió. kr. sum er 0,8 mió kr. lægri enn framroknað. Kostnaðurin fyri fyrisitingina bleiv framroknaður til 19,4 mió. kr., meðan hesin var 16,8 mió. kr. ella 2,6 mió. kr. lægri enn framroknað. Samanumtikið er kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar 4,2 mió. kr. lægri enn framroknað.

Talva 4 sundurgreinar nærri frávikini innan kostnaðin fyri tilfar og tænastuveitingar í krónum.

Lønarkostnaðurin fyri framleiðsluvirkini var framroknaður til 32,7 mió. kr., meðan staðfesti lønarkostnaðurin var 32,0 mió. kr. ella 0,7 mió. kr. lægri enn framroknað. Fyri netvirksemið bleiv lønarkostnaðurin framroknaður til 22,3 mió. kr. mótvegis einum staðfestum kostnaði upp á 22,1 mió. kr. ella 0,2 mió. kr. lægri. Orsøkin til frávikið millum virkisøkini er m.a., at í framrokningini er ikki í nóg stóran mun tikið hædd fyri býtið av lønarkostnaðinum millum virkisøkini. Samanlagt er frávikið 0,9 mió. kr. lægri enn framroknað.

Lønarkostnaðurin hjá fyrisitingini var framroknaður til 13,1 mió. kr. móti einum staðfestum lønarkostnaði upp á 11,2 mió. kr. ella 1,9 mió. kr. lægri enn framroknað. Frávikið stavar í mestan mun frá, at roknað var við størri eftirlønarskyldum enn hesar vísti seg at verða við endan av 2015.

Samlaði kostnaðurin fyri lønir var framroknaður til 68,1 mió. kr., meðan hesin var 64,3 mió. kr. ella 3,8 mió. kr. lægri enn framroknað.

Avskrivingarnar taka støði í verandi ognum eins og til- og frágongd av ognum í 2015. Íløgurnar fyri 2015 vóru framroknaðar at verða 272,2 mió. kr., men vóru 232,1 mió. kr., ella 40,1 mió. kr. lægri. Avskrivingarnar vórðu framroknaðar til at verða 86,9 mió. kr., meðan hesar vóru 93,6 mió. kr., sum eru 6,7 mió. kr. hægri enn framroknað, grundað á størri tilgongd enn framroknað.

Framroknað var við einum nettorentukostnaði upp á 24,4 mió. kr., meðan hesin var 24,8 mió. kr. ella 0,4 mió. kr. hægri. SEV hevur framhaldandi tingast við peningastovnarnar um rentukostnaðin, og hetta hevur ávirkað gongdina í kostnaðinum rætta vegin. Harumframt er samlaða lántøkan hjá felagnum í 2015 ikki eins stór og ætlað, eins og at lántøkan hjá felagnum ikki er gjørd eins skjótt og ætlað vegna gott gjaldføri. Hesi viðurskiftini ávirka rentukostnaðin rætta vegin.

Núverandi langtíðarlánini hjá SEV hava øll í 2015 broytiliga rentu. Felagið hevur við árslok 2015 umlagt rentuna til eina fasta rentu soleiðis, at størsti parturin av lánunum hjá felagnum frá primo 2016 at rokna hava fasta rentu.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá felagnum

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk og tilfar og tænastuveitingar. Hesar útreiðslur verða aftur býttar millum framleiðsluvirksemi, netvirksemi og fyrisiting.

Rakstrarúrslitið fyri 2015 var eitt yvirskot upp á 103,1 mió. kr. móti einum yvirskoti upp á 57,8 mió. kr. í 2014. Tann av eyka-aðalfundinum 28. november 2014 samtykta fíggjarætlanin vísir eitt yvirskot upp á 37,2 mió. kr. fyri 2015.

Felagið hækkaði elprísin 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið tá saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum um at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni, verður neyðugt við príshækkingum í framtíðini. Tí hækkaði felagið aftur elprísin tann 1. januar 2012 við 0,10 kr. pr. kWt og aftur tann 1. januar 2013 við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar vanligar brúkarar og 0,11 kr. kWt fyri „ídnaðarkundar", sum eru kundar felagsins í serstøku gjaldskránni fyri ídnaðarvirkir,

*Talva 4. Sundurgreining av frávikum*

| Framleiðslupartur | Ætlan | Framrokning | Roknskapur 2015 | Frávik millum ætlan og roknskap 2015 | Frávik millum framroknað og roknskap 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vatnorkuverk tilsamans | 6.143.100 | 4.484.170 | 5.197.492 | -945.608 | 713.322 |
| Termisk verk tilsamans | 14.469.700 | 10.390.967 | 9.779.003 | -4.690.697 | -611.964 |
| Vindorkuverk tilsamans | 6.698.816 | 6.822.362 | 5.863.898 | -834.918 | -958.464 |
| Smáverk v.m. tilsamans | 1.356.500 | 310.240 | 439.998 | -916.502 | 129.758 |
| **Framleiðslupartur tilsamans** | **28.668.116** | **22.007.739** | **21.280.390** | **-7.387.726** | **-727.349** |
| **Netpartur** | | | | | |
| Net tilsamans | 8.131.100 | 6.786.418 | 6.439.775 | -1.691.325 | -346.643 |
| Goymsla tilsamans | 853.500 | 318.895 | 517.472 | -336.028 | 198.577 |
| Innleggingardeild | 1.873.200 | 1.973.223 | 1.860.549 | -12.651 | -112.674 |
| Koplingarstøðir | 985.700 | 511.817 | 601.807 | -383.893 | 89.990 |
| Verkfrøðideild | 1.941.300 | 2.457.355 | 1.705.673 | -235.627 | -751.682 |
| Teknikkdeild | 433.200 | 599.291 | 690.162 | 256.962 | 90.871 |
| **Netpartur tilsamans** | **14.218.000** | **12.646.999** | **11.815.439** | **-2.402.561** | **-831.560** |
| **Fyrisiting** | | | | | |
| Fyrisitingarkostnaður | 5.274.750 | 4.448.320 | 3.955.245 | -1.319.505 | -493.075 |
| Tryggingarkostnaður | 1.244.300 | 1.466.564 | 1.812.963 | 568.663 | 346.399 |
| Lýsingar og telefon | 1.024.900 | 1.002.836 | 989.888 | -35.012 | -12.948 |
| Nevnd og starvsfólk | 4.046.250 | 2.631.510 | 2.047.064 | -1.999.186 | -584.446 |
| Kanning og ráðgeving | 10.318.200 | 5.670.790 | 4.379.414 | -5.938.786 | -1.291.376 |
| Bygningar v.m. | 1.372.000 | 1.298.688 | 1.213.500 | -158.500 | -85.188 |
| Kt-kostnaður | 1.779.600 | 2.314.286 | 2.782.263 | 1.002.663 | 467.977 |
| Tap og avseting upp á skuldarar | 950.000 | 577.905 | -340.458 | -1.290.458 | -918.363 |
| **Fyrisitingarpartur tilsamans** | **26.010.000** | **19.410.900** | **16.839.880** | **-9.170.120** | **-2.571.020** |
| **Net og fyrisiting tilsamans** | **40.228.000** | **32.057.899** | **28.655.319** | **-11.572.681** | **-3.402.580** |
| **Framleiðsla, net og fyrisiting tilsamans** | **68.896.116** | **54.065.638** | **49.935.709** | **-18.960.407** | **-4.129.929** |

fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur við eini árligari nýtslu størri enn 20.000 kWt.

Harumframt hækkaði felagið eisini íbindingargjøldini galdandi frá 1. januar 2013 fyri at skapa lønsemi í virkisøkinum innan íbinding. Hesin kostnaður hevði ikki verið javnaður seinastu mongu árini, tí hekk raksturin innan hetta virkisøkið ikki saman. Við hækkingini javnvigar økið.

Prísurin fyri ídnaðarkundarnar var aftur hækkaður við 0,05 kr. í januar í 2014. At hækka prísin fyri einstakar kundar meiri enn aðrar er liður í at fremja eitt betri lønsemi í teimum ymisku kundabólkunum.

Eingin prísbroyting er framd í 2015.

SEV hevur sett sær sum langtíðarmál, at skuldin í mun til EBITDA ikki skal verða størri enn 6,0 ferðir. Hetta støðið klárar felagið at halda í løtuni, nú avlopið frá rakstrinum í 2015 er 103,1 mió. kr., og skuldin í mun til EBITDA í 2015 er 2,8 ferðir.

Úrslitið í 2016 verður ætlandi eitt avlop á 72,5 mió. kr., har EBITDA í mun til nettoskuldina verður 4,7 ferðir. SEV ætlar ikki at broyta elprísin í 2016, eins og tey føstu gjøldini heldur ikki verða broytt.

Komandi 5 árini er neyðugt at hava eitt munagott yvirskot soleiðis, at rakstur felagsins kann geva eina munagóða sjálvsfígging til íløgurnar, sum standa fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at umganga at skuldin hjá felagnum gerst ov stór, ella at felagið ikki megnar at fáa til vega lán við nøktandi treytum. Somuleiðis skal inntøkan frá rakstrinum verða á einum slíkum støði, at felagið er ført fyri at halda sínar skyldur, sjálvt um afturgongd verður.

Fyri at røkka hesum máli hevur SEV, umframt at meta um tørvin fyri at javna prísin, kannað raksturin og gjørt metingar av útreiðslum og íløgum, sum eru ætlaðar komandi ár. Umráðandi er, at fíggjarætlanin er burðardygg og hevur fíggjarliga styrkju komandi árini, nú ætlanin er at fara undir stóru verkætlanina at víðka Sundsverkið fyri eina upphædd millum 700-800 mió. kr. samstundis, sum felagið ger íløgur á øðrum økjum eisini.

Niðurstøðan av hesum er, at sum støðan er í dag við góða úrslitinum upp á 103,1 mió.kr. í 2015 grundað á øktari kWt-sølu, lágum oljuprísi og lágari rentu, stórum parti av elframleiðsluni framleiddur við vindi og vatni, verður ikki neyðugt at broyta upp á prísirnar hjá felagnum mótvegis kundunum fyri at røkka málinum um, at nettoskuldin í mun til úrslitið áðrenn avskrivingar og rentur (NIBD/EBITDA) ikki má verða størri enn 6 ferðir. Fyri at røkka málinum fyri alt tíðarskeiðið 2016-2025 er neyðugt framhaldandi at hava eitt gott úrslit, sum minst er á hædd við væntaða úrslitið fyri 2016.

Hinvegin um afturgongd kemur í kWt-søluna, ella oljuprísurin aftur fer upp, so verður helst neyðugt at gera broytingar í elprísinum, skal felagið fremja ætlaðu víðkanina av Sundsverkinum og aðrar íløgur, samstundis sum at nettoskuldin í mun til úrslitið áðrenn avskrivingar og rentur (NIBD/EBITDA) ikki má verða størri enn 6 ferðir í tíðarskeiðnum 2016-2025.

## Inntøkur

Tað eru tríggir tættir, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir tættirnir eru elprísbroytingar, broytingar í elnýtsluni og forskjótingar ímillum ymiskar kundaprísbólkar.

Samlaðu inntøkur felagsins í 2015 vóru 424,4 mió. kr. móti 413,1 mió. kr. í 2014 svarandi til eina framgongd upp á 11,3 mió. kr. ella 2,7%. Nógv tann størsti parturin av inntøkuni stavaði frá streymgjaldi svarandi til 385,0 mió. kr., meðan 39,3 mió. kr. vóru inntøkur frá føstum gjøldum og øðrum inntøkum. Talan er um sama mynstur sum undanfarin ár. Talva 5 vísir nettoumsetning felagsins sundurgreinaðan seinastu 6 árini í mió. kr.

*Talva 5*

| Nettoumsetningur í mió. kr. | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Broyting í kr. í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KWt gjald | *261,8* | *296,4* | *335,0* | *362,4* | *379,2* | 385,0 | 5,8 | 1,5 |
| Fast gjald | *16,1* | *16,5* | *16,4* | *16,6* | *16,5* | 16,4 | 0,0 | -0,3 |
| Íbinding | *1,6* | *1,3* | *2,3* | *6,9* | *14,7* | 16,2 | 1,5 | 10,4 |
| Ómaksgjald v.m. | *1,3* | *5,0* | *4,7* | *1,3* | *2,7* | 6,7 | 4,0 | 144,1 |
| **Inntøkur** | ***280,8*** | ***319,2*** | ***358,3*** | ***387,2*** | ***413,1*** | **424,4** | **11,3** | **2,7** |
| Keyp av vindorku | *-2,6* | *-2,8* | *-2,5* | *-2,6* | *-2,5* | -2,4 | 0,1 | -5,4 |
| **Nettoumsetningur** | ***278,3*** | ***316,4*** | ***355,8*** | ***384,6*** | ***410,6*** | **422,0** | **11,4** | **2,8** |

*Talva 6*

| Úrslit fyri seldan kWt í krónum | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Broyting í kr. í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 ) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðalinntøka pr. seldan kWt | *1,10* | *1,25* | *1,37* | *1,41* | *1,46* | 1,47 | 0,01 | 1,5 |
| Miðalkostnaður pr. seldan kWt | *1,28* | *1,40* | *1,42* | *1,37* | *1,25* | 1,11 | -0,14 | -11,0 |
| Úrslit fyri seldan kWt | *-0,18* | *-0,15* | *-0,05* | *0,04* | *0,21* | 0,37 | 0,15 | 70,2 |

*Talva 7*

| Avroknað søla í GWt. | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Partur av fram-leiðslu í % | Broyting í GWt í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avroknað søla til kundar í GWt | *255,0* | *254,8* | *261,4* | *274,4* | *283,8* | 288,1 | 91,6 | 4,3 | 1,5 |
| Nettap og eginnýtsla í GWt | *25,3* | *19,0* | *30,1* | *18,1* | *21,6* | 26,3 | 8,4 | 4,7 | 22,0 |
| **Framleiðsla tils. í MWt pr. ár** | ***280,3*** | ***273,8*** | ***291,6*** | ***292,5*** | ***305,4*** | **314,4** | **100,0** | **9,0** | **2,9** |
| Herav við termisk | *199,3* | *166,8* | *181,0* | *180,1* | *150,2* | 125,5 | 39,9 | -24,7 | -16,4 |
| Herav við vatni | *67,4* | *92,5* | *99,8* | *90,6* | *120,7* | 133,1 | 42,3 | 12,4 | 10,3 |
| Herav við vindi | *13,6* | *14,5* | *10,8* | *21,8* | *34,5* | 55,8 | 17,8 | 21,3 | 61,7 |

Sum talva 5 vísir, eru inntøkur felagsins hækkaðar støðugt frá 2010 fram til 2015. Hetta kemur ikki einans av, at avroknaða elnýtslan hjá kundunum er vaksin, men eisini at prísurin er hækkaður í fleiri umførum seinastu árini fyri serliga at mótvirka hækkandi oljukostnaðinum hjá felagnum, sum verður brúktur í framleiðsluni.

Talva 6 vísir úrslitið fyri hvønn seldan kWt í krónum seinastu árini.

Fasta gjaldið hevur verið sera javnt øll seinastu árini umleið 16 mió. kr. árliga. Hinvegin eru inntøkurnar fyri íbinding, ómaksgjøld og aðrar inntøkur svingandi frá ár til ár. Talva 7 vísir millum annað gongdina í avroknaðu søluni til kundar felagsins seinastu 6 árini í GWt.

Sølan til kundar felagsins hevur staðið í stað fram til 2011, fyri síðani at hækka fram til 2015 framgongur av talvu 7. Frá 2009 til 2011 hevur sølan verið góðar 250 GWt árliga, meðan sølan í trý tey seinastu árini er vaksin við ávikavist 2,6% í 2012, 5,0 % í 2013, 3,4% í 2014 og 1,5 % í 2015.

Nettap og eginnýtsla hjá felagnum, har størsti parturin av postinum er nettap, er vaksið javnt gjøgnum seinastu árini við undantak av 2011, tá ið tað lækkaði til 19 GWt, fyri aftur at økjast til 30,1 GWt í 2012. Í 2013 var nettapið og eginnýtslan 18,1 GWt, meðan hetta er 21,6 GWt í 2014. Fyri 2015 var nettapið 26,3 GWt ella 4,7 GWt hægri. Stóri munurin millum árini stavar mest frá forskjótingini av avlesingum millum árini fyri nettap og eginnýtslu. Felagið arbeiðir áhaldandi við at minka um nettapið og eginnýtsluna.

Framleiðslan úr vindi og vatni ávirkast við at náttúran broytist frá ár til ár, og sum ávirkar bæði upp og niður. Vanliga liggur elframleiðslan við vatni á umleið 100 GWt árliga. Nú Eiði 2 er liðugt útbygt, kann væntast ein árlig framleiðsla við vatni upp á umleið 114 GWt árliga.

2013 var eitt serstakliga turt ár, sjálvt um tað regnaði illa frá miðan november og fram til ársskiftið. Harumframt hevði Heygaverkið ikki fulla framleiðslu ein part av 2013 orsakað uppstíging av verkinum. Fossáverkið hevur fyri ein part av 2014 ikki verið í framleiðslu

*Talva 8*

| Gongdin í útreiðslum í mió. kr. | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Broyting í kr. í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 | Kostnaður í 2015 í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Olja | *125,3* | *142,6* | *166,0* | *167,9* | *141,5* | 86,2 | -55,3 | -39,1 | 26,8 |
| Orkukeyp | *2,6* | *2,8* | *2,5* | *2,6* | *2,5* | 2,4 | -0,1 | -5,4 | 0,7 |
| Tilfar og tænastuveitingar | *65,3* | *74,9* | *53,5* | *54,1* | *49,8* | 49,9 | 0,1 | 0,2 | 15,5 |
| Lønir | *65,1* | *62,6* | *60,2* | *58,7* | *63,6* | 64,3 | 0,7 | 1,1 | 20,0 |
| Avskrivingar | *58,9* | *61,1* | *67,8* | *70,0* | *77,2* | 93,6 | 16,4 | 21,2 | 29,1 |
| Rentur | *10,1* | *14,5* | *20,5* | *22,0* | *20,6* | 24,8 | 4,2 | 20,5 | 7,7 |
| **Tilsamans** | ***327,2*** | ***358,5*** | ***370,6*** | ***375,4*** | ***355,3*** | **321,3** | **-34,0** | **-9,6** | **100,0** |

grundað á dagføring av stýriskipanum til turbinurnar. Hetta arbeiðið er liðugt, og verkið framleiður aftur elorku sum vanligt.

Sjálvt um Fossáverkið ikki hevur framleitt elorku ein part av 2014, so eydnaðist tað í 2014 at framleiða munandi meiri elorku við vatnmegi, tí 2014 var eitt gott ár til elframleiðslu við vatni. Nógv avfall var fram til apríl mánað, eins og heystið og veturin eisini var gott við nógvum avfalli.

Gongdin við nógvum avfalli helt fram í 2015, har serliga nógv avfall var alt várið og fram til í summar. Frá summar til í heyst var avfallið at rokna sum eitt vanligt miðalár, meðan í vetur var aftur nógv avfall. Elframleiðslan við vatni í 2015 var 133,1 GWt móti 120,7 GWt í 2014, sum er 12,4 GWt hægri enn í 2014 ella 10,3% hægri.

Fyrst í januar í 2012 fórst tann fyrra Vestas myllan í Neshaga og í mars í 2012 tann seinna. Hetta ávirkaði framleiðsluna av elmegi við vindi munandi í 2012. Hetta framgongur eisini á talvu 7. Munandi framgongd er í framleiðsluni av elmegi við vindi í 2013, tí nýggju vindmyllurnar í Neshaga vóru í framleiðslu alt árið 2013. Í 2014 vaks framleiðslan við vindi munandi, tí nýggja vindmyllulundin í Húsahaga var tikin í nýtslu 9. oktober 2014. Framleiðslan vaks í 2014 við 12,7 GWt ella 58,3% í mun til 2013. Vindmyllulundin í Húsahaga hevur roynst væl og hevur verið í rakstri alt 2015. Harumframt hevur 2015 verið eitt gott vindár við nógvum vindi. Elframleiðslan við vindi var 55,8 GWt svarandi til, at 17,8% av elframleiðsluni stavar frá vindi. Felagið væntar at úrtøkan av framleiðsluni við vindi økist, nú nýggja battaríískipanin í Húsahaga væntandi verður tikin í nýtslu í mars 2016.

Fyri nærri sundurgreiningum av framleiðslu og býti v.m. verður víst til framleiðsluroknskapin hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo

## Útreiðslur

Talva 8 vísir gongdina í samlaðu útreiðslunum hjá felagnum síðani 2010 til 2015 í mió. kr.

Av frammanfyri standandi talvu framganga útreiðslurnar seinastu árini. Talan er um eina lækking upp á 34,0 mió. kr. ella 9,6% í mun til undanfarna ár.

Í framleiðslu- og í netroknskapinum er kostnaðurin fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt umframt kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum umrøddur. Víst verður til hesar roknskapir, sum síggjast á www.sev.fo.

## Oljuútreiðslur

Av frammanfyri standandi talvu framgongur, at næst størsti parturin av útreiðslunum er kostnaðurin til olju. Hesin kostnaður er beinleiðis tengdur at prísbroytingum á heimsmarknaðinum, umframt elnýtslubroytingini og sveiggjunum í framleiðsluni av elmegi við vindi og vatni. Oljuútreiðslurnar fyri 2015 vóru 86,2 mió. kr. móti 141,5 mió. kr. í 2014, svarandi til at hesar vóru 55,3 mió. kr. lægri enn í 2014.

Í fíggjarætlanini fyri 2015 vóru oljuútreiðslurnar mettar til at verða 109,1 mió. kr., svarandi til at hesar vóru 22,9 mió. kr. lægri enn upprunaliga ætlað. Í oljuútreiðslunum er kostnaður til tungolju, gassolju og smyrjiolju, men parturin til tungoljuna er størstur.

Tað regnaði væl meiri enn vanligt í 2015. Framleiðslan av elmegi við vatni í 2015 var 10,3 % hægri enn í 2014, har avfallið eisini var nógv. Vanliga liggur elframleiðslan við vatni, eftir at Eiði 2 Suður er innroknað í framleiðsluna, upp á umleið 114 GWt, meðan hon í 2015 var 133 GWt. Somuleiðis var framleiðslan við vindi væl

*Talva 9*

| Talva 9. Gongdin í lønarútreiðslum í mió. kr. | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Broyting í kr. í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | *31,1* | *32,1* | *28,3* | *30,7* | *30,9* | 32,0 | 1,1 | 3,7 |
| Net | *23,9* | *20,4* | *20,0* | *19,5* | *19,9* | 21,1 | 1,2 | 6,2 |
| Fyrisiting | *10,0* | *10,0* | *11,9* | *8,6* | *12,9* | 11,2 | -1,7 | -13,0 |
| **Tilsamans** | ***65,1*** | ***62,6*** | ***60,2*** | ***58,7*** | ***63,6*** | **64,3** | **0,7** | **1,1** |

meiri enn undanfarna ár, serliga av tí at nýggja vindmyllulundin í Húsahaga hevur verið í rakstri alt 2015.

Oljuútreiðslurnar svara til 26,8% av samlaða kostnaðinum fyri 2015. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursinum á dollaranum verður munandi øðrvísi enn ætlað í fíggjarætlanini. Við støði í tí strategi felagið hevur at halda løgdu fíggjarætlanina, hevur felagið prístryggjað (hedgað) oljukeypið fyri 2015 til ein lægri prís ein ætlaða kostnaðin av keypinum í fíggjarætlanini. Orsøkin er fallandi oljuprísurin seinastu tíðina.

Fyri nærri sundurgreiningar av oljukostnaðinum og prísi v.m. verður víst til framleiðsluroknskapin hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo

## Lønarútreiðslur

Talva 9 vísir gongdina í samlaðu lønarútreiðslunum frá 2010 til 2015 í mió. kr.

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið vóru 32,0 mió. kr. í 2015 móti 30,9 mió. kr. í 2014 ella ein hægri lønarútreiðsla upp á 1,1 mió. kr., svarandi til áleið somu nýtslu av lønum á teimum flestu verkunum.

Lønarútreiðslurnar til netvirksemið hava verið á sama støði seinastu árini. Lønarútreiðslan fyri netvirksemið í 2015 var 21,1 mió. kr. móti 19,9 mió. kr. í 2014 ella ein hægri nýtsla upp á 1,2 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina hava verið støðugar øll tey seinastu 5 árini umleið 10 mió. kr. árliga. Í 2012 hækkaðu hesar við 1,9 mió. kr., orsakað hækking í eftirlønarskyldunum hjá felagnum. Sama er galdandi í 2013, har eftirlønarskyldurnar lækkaðu við 1,9 mió. kr., meðan hesar hækkaðu við 1,2 mió. kr. aftur í 2014 orsakað javning av eftirlønarkyldunum. Í 2015 eru eftirlønarskyldurnar lækkaðar við 0,7 mió. kr. soleiðis, at lønarútreiðslurnar til fyrisitingina eru 11,2 mió. kr. ella 1,7 mió. kr. lægri.

Verður sæð burtur frá javnan av eftirlønarskylduni, eru lønarútreiðslurnar í 2015 11,9 mió. kr. móti 11,7 mió. kr. í 2014, sum eru 0,2 mió. kr. hægri enn undanfarna ár. Nógv virkisøkir eru í felagnum, og SEV fylgir teimum almennu sáttmálunum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum.

## Tilfar og tænastuveitingar

Talva 10 vísir gongdina í samlaðu útreiðslunum til tilfar og tænastuveitingar frá 2010 til 2015 í mió. kr.

*Talva 10*

| Samlaðar útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar í mió. kr. | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | Broyting í kr. í mun til 2014 | Broyting í % í mun til 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | *31,8* | *43,3* | *27,6* | *24,1* | *21,1* | 21,3 | 0,1 | 0,7 |
| Net | *18,5* | *15,1* | *12,3* | *15,4* | *11,9* | 11,8 | -0,1 | -0,5 |
| Fyrisiting | *15,0* | *16,5* | *13,6* | *14,6* | *16,8* | 16,8 | 0,0 | 0,1 |
| **Tilsamans** | ***65,3*** | ***74,9*** | ***53,5*** | ***54,1*** | ***49,8*** | **49,9** | **0,1** | **0,2** |

Talvan vísir, at útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar áður hava verið á einum hægri støði enn í 2015.

Útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar í 2015 vóru 49,9 mió. kr. móti 49,8 mió. kr. í 2014, svarandi til eina hægri nýtslu upp á 0,1 mió. kr. ella á sama støði sum undanfarna ár.

## Fíggjarkostnaður

Felagið hevur í 2015 arbeitt við at umskipa samlaðu skuldina og fáa fígging til vega at fíggja íløgurnar í 2016. Í juni 2015 gjørdi felagið avtalu við fíggjarveitarar um at veita felagnum nýggja fígging at umfíggja verandi fígging og fyri at nøkta fíggjartørvinum fyri 2016, tilsamans ein samlað skylda á 1.100 mió. kr. Bruttoskuldin við árslok 2015 er 830 mió. kr., og felagið hevur ein óbrúktan trekningsrætt upp á 268,6 mió. kr. Rentuútreiðslurnar netto vóru 24,8 mió. kr. í 2015 móti 20,6 mió. kr. í 2014 svarandi til eina hægri útreiðslu upp á 4,2 mió. kr. Felagið er viðkvæmt fyri broytingum í altjóða rentustøðinum, tí skuldin í 2015 hjá felagnum er upptikin við broytiligari rentu. Við árslok 2015 hevur felagið inngingið rentutryggingaravtalur (SWAP-avtalur) fyri 600 mió. kr. av bruttoskuldini við árslok upp á 830 mió. kr. soleiðis, at størsti parturin av skuldini hjá felagnum nú er til fasta rentu.

## Avskrivingar

Avskrivingarnar fyri 2015 vóru 93,6 mió. kr. móti 77,2 mió. kr. í 2014 svarandi til 16,4 mió. kr. hægri. Hetta merkir, at avskrivingarnar nú er størsti útreiðsluposturin svarandi til 29,1% av samlaða kostnaðinum. Áður var tað oljukostnaðurin, sum var størsti útreiðsluposturin. Henda broyting er íkomin grundað á fallandi oljunýtslu hjá felagnum, fallandi oljuprísum á marknaðinum og størri íløgum sum felagið ger, sum aftur viðførur størri avskrivingar.

Øktu avskrivingarnar stava frá teimum íløgum og tilgongd til avskrivingar, sum felagið hevur gjørt í 2015. Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva upp á ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vóru nakað lægri enn ætlað.

Í sambandi við gerð av ársroknskapinum fyri 2012 var avskrivingarhátturin endurmettur galdandi fyri dagføring ella livitíðarleinging av motorum og turbinum v.m. Áður er kostnaðurin av hesum útreiðsluførdur í rakstrarárinum, tá ið dagføringin er gjørd. Frameftir verður hesin kostnaður avskrivaður yvir livitíðarleingingina, sum er framdur í staðin fyri at verða útreiðsluførdur undir einum í rakstrarárinum. Hesin háttur viðførir eina javna kostnaðargongd.

Hetta merkir tó ikki, at felagið uttan víðari kann lække elprísin ella lata vera at hækka hann, tí tá verður einki gjaldførisavlop frá rakstrinum, sum skal tryggja eginfíggingina av ætlaðum íløgum. Javnvág má verða í rakstri felagsins. Eitt úrslit við ongari eginfígging er ikki nøktandi, um SEV skal gera íløgur í endurnýggingar á termisku elverkunum og útbygging av netinum, samstundis sum íløgur skulu fremjast í útbygging av varandi orkukeldum.

## Serligir váðar

Felagið hevur avmarkaðan váða av einstøkum kundum. Felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum.

Sum nevnt undir brotinum um fíggjarkostnaðin, er felagið harumframt viðkvæmt fyri broytingum í rentustøðinum, men hevur valt ikki at tryggja móti rentuváða við fíggjarligum amboðum ella líknandi í 2015. Felagið fylgir væl við gongdini í rentustøðinum og metir áhaldandi um, hvørt tað er ein fyrimunur at tryggja seg móti rentuváðanum. Felagið hevur við árslok tryggjað seg móti rentuváðanum sambært niðanfyri standandi leisti.

Eisini er felagið viðkvæmt fyri broytingum í oljuprísinum og kursinum av dollarum, tí oljan verður keypt í dollarum. Hesin kostnaður er tann næst størsti, sum felagið hevur í fíggjarætlanini, eftir avskrivingarnar. Felagið hevur í 2015 prístryggjað oljukeypið við einum lægri kostnaði enn ætlaða kostnaðin sambært fíggjarætlanini. Felagið hevur víðkað leistin fyri at prístryggja oljukeypið og gjaldoyrisváðan sambært niðanfyri standandi leisti.

Somuleiðis hevur felagið endurmett váðan í sambandi við tryggingar sambært niðanfyri standandi leisti.

## Prístryggingarstrategi fyri olju, gjaldoyra og rentu

SEV hevur serliga seinastu tvey árini gjørt stórar íløgur í framleiðslueindir og net, og SEV skal framhaldandi gera stórar íløgur, eitt nú í víðkan av Sundsverkinum, væntandi fyri eina upphædd millum 700 og 800 mió. kr. Grundað á allar íløgurnar, sum SEV hevur gjørt og er í fer við at gera, kann sigast, at SEV í ein ávísan mun eisini er eitt verkætlanarfelag, har tað er neyðugt at hugsa langskygt og leggja fíggjarætlanir, sum samsvara hesum. Hetta viðførir, at tað er umráðandi at kenna týdningarmiklu kostnaðirnar, eitt nú oljukostnaðin, gjaldoyrakostnaðir og rentukostnaðir.

Møguleikin hjá SEV at heinta øktan kostnað inn í gjøgnum elprísin ella onnur gjøld, partvíst ella heilt, er avmarkaður og møguleikin at hava undirskot ella ikki nøktandi úrslit av rakstrinum, letur seg bara gera í eitt ávíst tíðarskeið. Prísstøðið er í síðsta enda eitt mál fyri eigararnar hjá SEV og harvið politiskt tengt, við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum, meðan fígging av øktum kostnaði umvegis gjaldføri frá fígging letur seg bara gera í eitt styttri tíðarskeið, og avmarkar møguleikarnar fyri ætlaðum íløgum, tá fíggjarliga orkan fer til at fíggja øktan kostnað.

Í sambandi við lántøku hjá SEV hyggja fíggjarstovnar eftir roknskaparligu lyklatølunum fyri týdningarmiklastu økini, og kravið til hesi

lyklatøl er støðufesti. Fyri at fáa kappingarføra fígging til vega er neyðugt hjá SEV at møta ella lúka krøvunum frá fíggjarveitarum um at avdekka týdningarmiklastu váðarnar mótvegis vaksandi kostnaði, eins og SEV sjálvt metir tað skilagott. Tá ið SEV fer út á lánimarknaðin at heinta fígging, verður SEV samanborið við onnur tilsvarandi feløg, og skal tí kappast við hesi um at tekkjast fíggjarveitarum, fyri at fáa bestu fíggingina.

SEV er ein áhugaverdur kundi at veita fígging til, og kann sambært ráðgevum tess skrásetast sum ein "investment grade" kundi. Hetta gevur møguleika fyri einari góðari fígging upp á fleiri mátar. Skal SEV halda hetta "ratingstøði", er neyðugt at hava ein støðugan rakstur við einum nøktandi avkasti, sum ger, at roknskaparligu lyklatølini verða á hædd við lyklatølini hjá feløgunum, sum SEV kappast við um fíggingina.

Tí hevur SEV saman við SEB, sum er ráðgevari hjá SEV innan fíggjarøkið og "prístryggingarøkið", arbeitt við eini "prístryggingarstrategi" (hedgingstrategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu. Prístryggingarstrategi'in er eisini partur av lánsavtalunum, sum felagið fekk til vega í 2014 og juni 2015, har avtalan frá juni 2015 nøktar fíggingartørvin í 2015 og 2016.

## Strategi fyri trygging av oljuprísváða og gjaldoyrisváða

Ein avleiðing av íløguætlanini komandi árini er, at núverandi prístryggingarstrategi fyri olju og gjaldoyra er víðkað til at fevna um 4 ár aftrat. Hetta er sama tíðarskeið, tá ið lántøkan hjá felagnum væntast at hækka við umleið 700-800 mió. kr. til umleið 1.600 mió. kr. Í skrivandi løtu er oljuprísurin lágur sammett við oljuprísin fyri 1-2 árum síðani, hetta merkir aftur, at tíðin fyri at gera slíka prístrygging fyri eitt longri tíðarskeið er til fyrimunar fyri SEV.

Tó er hetta prísstøðið ikki avgerandi fyri sjálva prístryggingina, sum er gjørd fyri at tryggja ein støðugan rakstur.

SEV hevur avdekkað oljuprísváðan eftir niðanfyri standandi leisti.

| | Ár 1 | Ár 2 | Ár 3 | Ár 4 | Ár 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| Oljuprístrygging | 80% | 60% | 40% | 20% | 20% |

Hetta viðførir, at tryggingardekningurin verður stovnaður ár eitt fyri einstøku rakstrarárini. Í ár tvey verður hesin tryggingardekningur so øktur fyri aftur at endurgeva ein avdekning upp á 5 ár. Hesin leistur tryggjar eina stigvísa stovnan av tryggingini á einum støði, sum endurgevur eina miðal prísgongd av teimum ymisku árunum. SEV hevur avdekkað váðan við eini fastprístrygging.

Samstundis sum tryggingardekningurin fyri prísin upp á oljuna er gjørdur, eru teir dollarar, sum skulu nýtast til oljukeypið eisini keyptir upp á termin, fyri harvið at avdekka gjaldoyrisváðan í dollarum.

Við einum hækkandi oljuprísi og hækkandi dollarkursi fer ein slík avdekkan av oljuprísváðanum og gjaldoyraváðanum at hava eina tálmandi ávirkan á kostnaðin, og rakstrarúrslitið gerst meiri støðugt.

## Strategi fyri trygging av rentuváða

SEV hevur sum strategi at tryggja upp til 75% av skuldini við eini gildistíð longri enn 12 mánaðir til eina fasta rentu. Somuleiðis skal gildistíðin av fastløstu rentuni verða millum 5 og 8 ár. Hetta verður gjørt á tann hátt, at SEV kann arbeiða við avdekningum av rentuváðanum innanfyri eitt spenn millum 50 og 75% av skuldini til eina og hvørja tíð. Skuldin kann hava eina avtalaða fasta rentu ella eina broytiliga rentu, sum verður avdekkað við eini avtalu um umbýting av broytiligari rentu til fasta rentu (rentuswap).

Hesin háttur krevur, at fastrentuskuldin skal viðlíkahaldast soleiðis at skilja, at tá ið fastrentuparturin antin fellur undir 50% ella økist til yvir 75%, skulu tillagingar gerast í rentuumbýtingaravtalunum (rentuswaps-avtalunum). Hetta viðførir, at ávísar rentuumbýtingaravtalur skulu endast fyri til dømis at umganga, at ein størri partur enn 75% er rentutryggjaður. Hetta viðførir aftur, at virðið av rentuumbýtingaravtaluni skal gerast upp. Eitt jaligt virði lækkar fíggjartørvin hjá SEV, meðan eitt neiligt virði økir fíggjartørvin. Javningin av rentutryggingaravtalunum skal bókast yvir eginogn felagsins. SEV fer at stremba eftir, at hava eina javna samanseting av rentutryggingaravtalum yvir tíð, har málið er at hava eina miðal fasta rentu millum 5 til 8 ár.

SEV hevur í 2015 tryggjað rentuna á 73% av síni bruttoskuld við árslok upp á 830 mió. kr. við eini miðal gildistíð upp á 7 ár. Hetta er samsvarandi strategi fyri trygging av rentuváða. Sostatt fer ein øking í rentustøðinum generelt ikki at ávirka størsta partin av kostnaðinum fyri skuldina komandi 7 árini.

## Strategi fyri tryggingarváða

SEV hevur saman við ráðgevara tess innan tryggingar Willis Føroyar arbeitt við avdekkan av tryggingarváðum soleiðis, at miðað verður eftir, at eingin einstakur skaði og samanlegging av skaðum skal ávirka rakstrarúrslitið hjá SEV við meiri enn 10 mió. kr.

## Strategi fyri gjaldførisváða

SEV hevur sum mannagongd, at áðrenn farið verður í gongd við einstakar verkætlanir, skal fígging til hesar fyriliggja, áðrenn byrjað verður. Við hesum er fígging altíð tøk til verkætlanirnar.

Harumframt skal felagið altíð í minsta lagi hava 100 mió. kr. innistandandi í peningastovnum at taka til, um tað gerst neyðugt. Í sambandi við rakstur er felagið við hesum 100 mió. kr. ført

*Talva 11*

| Talva 11. Íløgur í mió. kr. | Upprunaætlan 2015 fyri íløgur | Umraðfesting av íløgum 2015 | Ætlan eftir umraðfesting | Íløgursambært roknskap 2015 | Frávik í mun til roknskap og javnað ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3=1+2 | 4 | 5=3-4 |
| Fossáverkið | 2,8 | 1,1 | 3,9 | 4,3 | -0,4 |
| Heygaverkið | 0,4 | 0 | 0,4 | 0,1 | 0,3 |
| Mýruverkið | 13,7 | -6,4 | 7,3 | 5,5 | 1,8 |
| Eiðisverkið | 1,3 | 0 | 1,3 | 2,4 | -1,1 |
| Verkið í Botni | 2,5 | 0 | 2,5 | 0,6 | 1,9 |
| Vágsverkið | 89,5 | 0 | 89,5 | 68,0 | 21,5 |
| Verkið í Trongisvági | 0,3 | 0 | 0,3 | 0,0 | 0,3 |
| Sundsverkið | 90,1 | 5,5 | 95,6 | 41,2 | 54,4 |
| Verkið á Strond | 1,9 | 0 | 1,9 | 0,5 | 1,4 |
| Smærri verk | 5,1 | -0,6 | 4,5 | 1,1 | 3,4 |
| Vindmyllur í Neshaga | 2,0 | 0 | 2,0 | 0,0 | 2,0 |
| Vindmyllur í Húsahagi | 8,2 | 0 | 8,2 | -2,0 | 10,2 |
| **Íløgur í framleiðsluvirkir tilsamans** | **217,6** | **-0,4** | **217,2** | **121,7** | **95,5** |
| Koplingarstøðir og net v.m. | 145,2 | 1,3 | 146,5 | 95,8 | 50,7 |
| Fyrisitingarbygningar, amboð, KT-útgerð | 44,6 | 0 | 44,6 | 14,6 | 30,0 |
| **Tilsamans** | **407,5** | **0,9** | **408,4** | **232,1** | **176,3** |

fyri at svara hvørjum sítt teir næstu umleið 6 mánaðirnar, uttan at felagið hevur nakrar inntøkur. Harumframt er ynskiligt, at hava atgongd til kassakredittir, sum stuðla undir gjaldførinum um neyðugt.

## Íløgur

Sambært fíggjarætlanini fyri 2015 var roknað við íløgum fyri tilsamans 407,5 mió. kr. og 408,4 mió. kr. eftir umraðfestingar. Nú árið er runnið, kann staðfestast, at bruttoíløgurnar vóru 232,1 mió. kr., sum eru 176,3 mió. kr. minni enn ætlað eftir umraðfestingina. Á talvu 11 eru íløgurnar sundurgreinaðar í mió. kr.

Talvan vísir upprunaætlanina fyri íløgur upp á 407,5 mió. kr. Umraðfestingar upp á 0,9 mió. kr. eru gjørdar innan verandi samtyktu karmar fyri íløgur upp á 407,5 mió. kr. og rakstur í 2015. Eisini framgongur íløguætlanin eftir umraðfestingini, sum verður samanborin við roknskapin 2015.

Í mun til fíggjarætlanina 2015 aftan á umraðfestingar upp á 0,9 mió. kr. eru nettoíløgurnar 232,1 mió. kr. og hetta er 176,3 minni enn ætlað. Hetta stavar frá, sum talva 11 vísir, lægri íløgur í m.a. Vágsverkið og Sundsverkið enn ætlað. Somuleiðis lægri íløgur í koplingarstøðir og fyrisitingarbygning enn ætlað.

Íløgan í Fossáverkið er 4,3 mió. kr., har 0,5 mió. kr. stava frá nýggjum kontrollanleggi, meðan 3,5 mió. kr. stava frá broyting og dagføring av bygninginum. Aðrar íløgur eru fyri 0,3 mió. kr.

Íløgur í Mýruverkið eru 5,5 mió. kr., har 3,9 mió. kr. stava frá livitíðsleinging av vatnrørum, og 1,6 mió. kr. er til nýggjar ventilar og leiðir.

Íløgan í Eiðisverkið er 2,4 mió. kr., har 1,9 mió. kr. er í Eiði 2 Suður og 0,2 mió. kr. í nýggja kontrollrúmið. Aðrar íløgur eru fyri 0,3 mió. kr.

Arbeiðið upp á víðkan av Vágsverkinum er byrjað í 2014. Tó er arbeiðið seinkað nakað orsakað av, at ósprongt dynamitt var funnið í tveimum umførum í sambandi við útgravingararbeiðið. Verkið væntast liðugt fyrst í mai 2016 umleið 4 mánaðir seinkað. Tí er íløgan í Vágsverkið nakað minni enn ætlað í 2015. Íløgan í Vágsverkið fyri 2015 er 68,0 mió. kr., har 67,3 mió. kr. eru í støð 3 (nýggja M4 motorin). Aðrar íløgur eru fyri 0,7 mió. kr.

Talva 12

| Talva 12. Íløgur í mió. kr. | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vatnorkuverk | *0,5* | *4,0* | *27,4* | *41,7* | *62,8* | *82,0* | *58,5* | *72,4* | 29,4 | 13,4 |
| Onnur elorkuverk | *2,3* | *2,8* | *20,2* | *13,4* | *3,3* | *0,8* | *60,0* | *34,7* | 149,5 | 108,3 |
| Býtisvirkir | *32,8* | *41,9* | *41,1* | *19,6* | *21,7* | *9,1* | *31,2* | *43,8* | 88,1 | 95,9 |
| Felagsognir | *0,0* | *0,8* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | 0,0 | 0,0 |
| Jarðarognir | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *0,0* | *1,0* | *0,0* | 0,0 | 0,0 |
| Onnur rakstrargøgn | *2,2* | *2,5* | *3,1* | *5,6* | *5,7* | *3,9* | *3,1* | *4,1* | 8,2 | 14,5 |
| **Tilsamans** | ***37,8*** | ***52,0*** | ***91,8*** | ***80,3*** | ***93,5*** | ***95,8*** | ***153,8*** | ***155,0*** | **275,2** | **232,1** |

Íløgan í Sundsverkið er 41,2 mió. kr. Arbeiðið upp á nýggja tangagarðin og dagtangahúsið er seinkað fleiri mánaðir, men arbeiðið væntast tó liðugt í 2017. Somuleiðis er íløgan í støð 3 (víðkanini av Sundsverkinum) minni enn ætlað í 2015. Dagføringin av stýrisskipanini av motorunum bleiv útsett eitt ár, og byrjað verður upp á hesa í 2016 í staðin fyri í 2015. Hetta viðførir, at staðfesta íløgan í Sundsverkið er munandi minni enn ætlað. Íløgan í dagtangagarðin er 23,2 mió. kr., íløgan í støð 3 við 7,0 mió. kr. har serliga talan er um fyrireiking av verkætlanini, íløgan í nýggju M3 og M3B motorarnar er fyri 3,6 mió. kr. Aðrar íløgur eru fyri 7,4 mió. kr.

Íløgan í verkið á Strond er 0,5 mió. kr., talan er um smærri íløgur.

Arbeiðið upp á koplingarstøðina og netið til vindmyllulundina í Húsahaga var byrjað í 2013, men størsti parturin av hesum arbeiði bleiv útsett til 2014. Koplingarstøðin er nú liðug og tikin í nýtslu. Ein regulering upp á -2 mió. kr. viðvíkjandi útveganina til koplingarstøðina í 2014 sæst í talvu 11. Henda upphædd var bókað á vindmyllurnar í Húsahaga, tó at hon av røttum hoyrir til koplingarstøðina. Upphæddin er flutt á rætta stað í 2015. Battaríini, sum skulu stuðla undir framleiðsluna av vindmyllunum í Húsahaga, komu til Føroyar í februar 2016. Hesi verða í løtuni sett upp.

Íløgur í koplingarstøðir og net eru fyri tilsamans 95,8 mió. kr. Íløgur í koplingarstøðir eru 38,1 mió. kr., meðan íløgur í net v.m. eru 57,7 mió. kr. Íløgan í koplingarstøðina innan Eið er 3,6 mió. kr., í koplingarstøðina á Húsareyni 15,8 mió. kr. og í koplingarstøðina í Runavík 18,7 mió. kr.

Av hesum 57,7 mió. kr. sum eru íløgur í net, kunnu sundurgreinast í íløgur fyri 4,8 mió. kr. í net í Norðoyggjum, 29,8 mió. kr. í Eysturoy, 1,3 mió. kr. í Vágoy, 1,4 mió. kr. í Miðstreymoy, 10,6 mió. kr. í Suðurstreymoy, 1,8 mió. kr í Sandoy og 4,8 mió. kr. í Suðuroy. Harumframt annað fyri net 3,2 mió. kr.

Íløgur í fjarskiftismálarar, verkfrøði og teknikk eru 12,3 mió. kr., har íløgan í nýggju fjarskiftismálararnar er 5,1 mió. kr., 1,6 mió.

Talva 13

| Talva 13. Íløgur tilsamans í mió. kr. | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 217,3 | *260,7* |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 14,8 | *14,5* |
| Íløgur við ársenda | 232,1 | *275,2* |

Talva 14

| Talva 14. Arbeiði í gerð í mió. kr. | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Saldo við ársbyrjan | 142,3 | *85,5* |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 217,3 | *260,7* |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -135,1 | *-203,9* |
| Saldo við ársenda | 224,4 | *142,3* |
| Broyting í arbeiði í gerð | 82,2 | *56,8* |

*Talva 15*

| Talva 15. Tilgongd til anlegsaktiv í mió. kr. | 2015 | 2014 |
|---|---|---|
| Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd | 135,1 | *203,9* |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á anlegsaktiv | 14,8 | *14,5* |
| **Tilgongd við ársenda** | **149,9** | ***218,4*** |

kr. í battarískipanina í Húsahaga, 1,4 mió. kr. í nýggja stýriskipan av elnetinum, 1,6 mió. kr. til vindmátimastur í Suðuroy og 0,9 mió. kr. til løðistøðir til elbilar. Aðrar íløgur eru fyri 1,7 mió. kr.

Íløgur í fyrisitingarbygningar, amboð, KT-útbúnað v.m. eru munandi lægri enn ætlað, serliga grundað á at dagføringin av fyrisitingarbygninginum við Landavegin ikki væntast at byrja fyrr enn seint í 2016. Íløgur eru gjørdar fyri 2,7 mió. kr., har 2,6 mió. kr. er KT-útgerð, skráir og annað fyri 0,1 mió. kr.

Talva 12 vísir samlaðu brutto íløgurnar hjá SEV frá 2007 til 2015 í mió. kr.

Síðani 2006 og fram til dagin í dag hevur SEV gjørt íløgur fyri 1.267,3 mió. kr., svarandi til 126,7 mió. kr. um árið seinastu 10 árini.

Talvur 13-15 vísa gongdina í íløgum, arbeiði í gerð og tilgongd til støðisogn í 2015 og 2014.

Íløgurnar upp á 232,1 mió. kr eru sundurgreinaðar í talvu 11.

Av talvu 14, arbeiðið í gerð, framgongur, at í 2015 eru íløgur fyri 217,3 mió. kr. móti 260,7 mió. kr. í 2014 bókaðar sum arbeiði í gerð í árinum, meðan 135,1 mió. kr. í 2015 móti 203,9 mió. kr. í 2014 av arbeiðinum í gerð við ársenda er flutt yvir til avskrivingargrundarlagið sum tilgongd til støðisogn.

Av salduni við ársenda upp á 224,4 mió. kr. í 2015 móti 142,3 mió. kr. í 2014 er framleiðsluparturin 131,7 mió. kr., og netparturin er 92,7 mió. kr. Av framleiðslupartinum upp á 131,7 mió. kr. viðvíkur 1,6 mió. kr. Mýruverkinum , 75,3 mió. kr. Vágsverkinum, 50,0 mió. kr. Sundsverkium og 4,8 mió. kr. øðrum.

Fyri netpartin upp á 92,7 mió kr. eru koplingarstøðir 24,8 mió. kr., net 47,5 mió. kr., battarí og stýrisskipanir 18,0 mió. kr. og annað 2,4 mió. kr. Samanumtikið kann sigast, at arbeiðið í gerð er økt við 82,2 mió. kr. í 2015 móti eini øking upp á 56,8 mió. kr. í 2014.

Av talvu 15 tilgongd til støðisogn framgongur, at í 2015 eru 149,9 mió. kr. móti 218,4 mió. kr. í 2014 fluttar til tilgongd undir støðisogn.

Størstu einstøku verkætlanir, sum fluttar eru sum tilgongd við ársenda, eru koplingarstøðin í Húsahaga upp á 57,9 mió. kr., nýggju M3 og MB3 motorarnir á Sundsverkinum upp á 18,4 mió. kr., sjókaðal um Skálafjørðin upp á 8,4 mió kr., sjókaðal um Fuglafjørð 8,2 mió. kr., bygningsumvæling á Fossáverkinum upp á 5,7 mió. kr. og aðrar smærri íløgur á 36,5 mió. kr.

Víst verður eisini til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

## Gjaldførið

Í fíggjarætlanini fyri 2015 var ætlað við eini lántøku upp á 246,9 mió. kr. Felagið hevur í 2015 økt um nettoskuldina við 138,6 mió. kr.

Gjaldførisbroyting felagsins frá rakstrinum var 183,9 mió. kr. í 2015 móti 159,0 mió. kr. í 2014, sostatt var sjálvfíggingin til íløgur og avdráttir positiv. Felagið skal eisini á hvørjum ári rinda avdráttir, hesir vóru 19,4 mió. kr. í 2015 móti 29,6 mió. kr. í 2014.

Gjaldføri felagsins við ársenda 2015 er 221,9 mió. kr. móti 131,5 mió. kr. í 2014. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 268,6 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 490,5 mió. kr. í 2015 móti 262,4 mió. kr. í 2014. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur í 2016.

Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

## Uttanhýsis umhvørvi

Felagið leggur dent á at fara væl um umhvørvið, og at reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

## Vitanarstøði og menning

Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Harumframt er SEV byrjað upp á leiðaraútbúgving til leiðararnar fyri betur at stuðla teimum í arbeiðinum hjá SEV. Felagið arbeiðir

framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind og sjóvarfall, harumframt nýggju stýriskipanini frá Schneider Electric, smartgrid-loysnum og Power Hub-skipanum.

## Útlit fyri rakstrarárið 2016

Síðani 2008 og fram til 2012 hevur felagið havt eitt samlað undirskot upp á 98,6 mió. kr. Hesin peningur er umvegis ov lágum elprísum latin elbrúkarunum. Í 2013 fekk felagið eitt yvirskot eftir skatt upp á 11,9 mió. kr., so sigast kann, at neiliga gongdin í rakstrinum er vend í 2013, og henda gongd hevur hildið áfram í 2014, tá úrslitið gjørdist eitt yvirskot upp á 57,8 mió. kr., og í 2015 gjørdist yvirskotið 103,1 mió. kr. Samanlagt síðani 2008 og fram til 2015 hevur felagið havt eitt samlað yvirskot á 74,1 mió. kr. ella eitt yvirskot í miðal upp á 9,3 mió. kr.

Gongdin við einum góðum yvirskoti væntast at halda áfram í 2016, har úrslitið er ætlað til 72,5 mió. kr. Felagið hevur prístryggjað 80% av sínum væntaða oljukeypi fyri 2016 til ein væl lægri prís enn ætlað í fíggjarætlanini, sostatt kann væntast, at úrslitið verður betur enn ætlað, men minni enn úrslitið í 2015.

At felagið í fleiri ár undan 2012 var rikið við undirskoti, er ikki nøktandi í longdini, tí er neyðugt alla tíðina at fremja haldgóðar loysnir fyri raksturin, herundir áseting av einum nøktandi kWt prísi. Tí verður nógv gjørt burtur úr at hyggja at prísskránni fyri at meta um, hvørt einstøku prísirnir eru teir røttu. Harumframt ger felagið í ávísan mun lønsemisútrokningar fyri kundabólkar og kundar fyri miðvíst at meta um lønsemið innan kundabólkarnar. Hetta arbeiðið heldur áfram í 2016.

Upprunaliga er roknað við eini øking í elnýtsluni upp á 1,7 % í miðal í 2016 í mun til staðfest 1,5 % í 2015. Hendan øking stavar frá vøkstri í fleiri kundabólkum við ymiskum vakstrarratum. Talan er um eina øking í søluni av kWt.

Við støði í søluni fyri 2014 og partvíst í 2015 er ætlað við eini sølu í 2016 upp á 296,6 GWt ella 397,1 mió. kr. Fasta gjaldið verður stórt sæð óbroytt upp á 16,7 mió. kr. Harumframt koma inntøkur frá íbindingargjaldinum og annað upp á 14,1 mió. kr. soleiðis, at ætlað er við eini samlaðari inntøku upp á 427,9 mió. kr. í 2016 móti 424,4 mió. kr. í 2015. Hetta svarar til, at felagið fær eina meiri inntøku upp á 3,5 mió. kr. í mun til 2015.

Avgjørt er, at SEV fer undir at stovna sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga og Húsahaga. Hetta viðførir, at keyp av vindorku fer at økjast, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingar og rentum fer at lækka. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið hjá SEV ávirkast ikki av hesum.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 135,2 mió. kr. í 2016 móti 114,2 mió. kr. í 2015 svarandi til eina meirútreiðslu upp á 21,0 mió. kr. ella 18,4 %. Orsøkin er, at ætlað er við størri viðlíkahaldsarbeiðum í 2016, eins og fleiri kanningum sambært virkisætlanini, sum SEV hevur gjørt saman við Vinnumálaráðnum og øðrum.

Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlan felagsins fyri 2016 mettar at verða 78,6 mió. kr. Felagið prístryggjaði størsta partin av sínum oljukeypi í 2015 til ein lægri kostnað enn ætlaða kostnaðin fyri oljuna, og hevur felagið eisini prístryggjað oljukeypið fyri 2016 í januar 2016 til ein lægri kostnað enn upprunaliga ætlað í fíggjarætlanini. Somuleiðis eru dollarar keyptir upp á termin til ein lægri kostnað enn innroknað í fíggjarætlanini, og fer hetta at viðføra ein lægri kostnað upp á umleið 18 mió. kr. Væntandi verða oljuútreiðslurnar fyri 2016 alt annað líkað 60,6 mió. kr. móti upprunaliga ætlað 78,6 mió. kr.

Ætlað er við 191,8 mió. kr. í úrsliti av vanligum rakstri í 2016. Ætlað er við avskrivingum upp á 90,9 mió. kr. og rentuútreiðslum netto upp á 29,4 mió. kr. Øktu rentuútreiðslurnar stava frá øktum íløgum og skuld hjá felagnum til at fíggja rakstur og íløgur. Orsøkin til at avskrivingarnar lækka er tann, at vindmyllulundin í Neshaga og Húsahaga eru lagdar í sjálvstøðug partafeløg, har avskrivingarnar fyri vindmyllulundirnar verða gjørdar.

Við einum ætlaðum yvirskoti upp á 72,5 mió. kr. fyri 2016 verður gjaldførisbroytingin frá rakstrinum ætlað til 60,6 mió. kr. Gjaldførið við ársenda 2016 verður ætlað til 192,8 mió. kr. Hesi tøl verða væntandi nakað betri orsakað lægri oljuútreiðslum.

Skal felagið framhaldandi gera neyðugar íløgur fyri at menna og viðlíkahalda net og framleiðsluverk eins og at fremja íløgur í útbygging av varandi orkukeldum, er neyðugt, at felagið hevur eina nøktandi sjálvfígging frá rakstrinum.

Við einari nøktandi sjálvfígging er felagið ført fyri at halda eitt nøktandi gjaldføri, ið er ein fyritreyt fyri at útvega fígging frá lánveitarum til tær stóru íløgurnar sum standa fyri framman komandi árini.

Nærri lýsing av 2016 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2016 á www.sev.fo.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella milliión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

## Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkreditlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin av netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin av netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er ein partur av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum á Sunds og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

## Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

## Av og niðurskrivingar

Av og niðurskrivingar umfata av og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

## Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýtið verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

# FÍGGJARSTØÐAN

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu og býtisvirkir | 10-50 ár | 0 % |
| Bygningar | 50 ár | 0 % |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

## Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur aftrat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virðið av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

## Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, við

einari lánitíð á 3 mánaðir sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

### Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

### Aðrar avsettar skyldur

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við, at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

### Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni soleiðis, at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld sum viðvíkja inntøkum komandi árini.

### Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkum peningi við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Pengingastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittar.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

### Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Renting av eginogn | $\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$ |
| Ognaravkast | $\frac{\text{Úrslit av primerum rakstri x 100}}{\text{Miðalvirði av aktivum}}$ |
| Nettoskuld/EBITDA | $\frac{\text{Nettoskuld (skuld – tøkur peningur)}}{\text{EBITDA}}$ |
| Ognarumferð | $\frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$ |
| Eginognarpartur | $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$ |



# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

| Nota | | 2015<br>DKK | 2014<br>t. DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettosøla | 421.952.498 | *410.551* |
| 2 | Oljuútreiðslur | -86.195.931 | *-141.500* |
| 3 | Tilfar og tænastuveitingar | -49.935.709 | *-49.834* |
| | **Bruttoúrslit** | **285.820.857** | ***219.217*** |
| 4 | Starvsfólkakostnaðir | -64.337.566 | *-63.644* |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **221.483.291** | ***155.573*** |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | -93.586.559 | *-77.197* |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **127.896.732** | ***78.376*** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 204.064 | *567* |
| 5 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -25.033.968 | *-21.180* |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **103.066.828** | ***57.763*** |
| 6 | Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **103.066.828** | ***57.763*** |
| | | | |
| | **Uppskot til býti av ársúrsliti** | | |
| | Flutt úrslit | 103.066.828 | *57.763* |
| | **Býti tilsamans** | **103.066.828** | ***57.763*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | OGN | 2015 DKK | 2014 t. DKK |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 7 | Framleiðsluvirkir | 897.628.335 | *913.395* |
| 7 | Býtisvirkir | 429.539.497 | *358.800* |
| 7 | Bygningar og jarðarøkir | 39.231.784 | *40.169* |
| 7 | Rakstrargøgn | 35.844.113 | *33.542* |
| 7 | Íløguarbeiði í gerð | 224.431.198 | *142.275* |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **1.626.674.927** | ***1.488.181*** |
| | | | |
| 8 | Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 2.850.000 | *2.850* |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | **2.850.000** | ***2.850*** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **1.629.524.927** | ***1.491.031*** |
| | | | |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Olja | 11.744.354 | *19.773* |
| | Tilfar | 15.293.017 | *26.731* |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **27.037.371** | ***46.504*** |
| 9 | Vøru og tænastuáogn | 77.533.673 | *68.796* |
| | Onnur áogn | 0 | *8* |
| | Tíðaravmarkingar | 4.387.430 | *4.239* |
| | **Áogn tilsamans** | **81.921.104** | ***73.044*** |
| | **Tøkur peningur** | **221.889.276** | ***131.459*** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **330.847.750** | ***251.007*** |
| | **OGN tilsamans** | **1.960.372.677** | ***1.742.038*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2015<br>DKK | 2014<br>t. DKK |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 10 | Innskot | 4.139.875 | *4.140* |
| | Flutt úrslit | 1.038.780.669 | *935.714* |
| | **Eginogn tilsamans** | **1.042.920.544** | ***939.854*** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsett til eftirløn og líknandi skyldur | 18.845.044 | *19.366* |
| | Aðrar avsettar skyldur | 0 | *0* |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **18.845.044** | ***19.366*** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 11 | Skuld til peningastovnar | 830.000.000 | *568.233* |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **830.000.000** | ***568.233*** |
| | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 0 | *123.178* |
| | Skuld til peningastovnar | 1.589.119 | *1.572* |
| | Móttikin frammanundangjøld frá kundum | 19.481.196 | *21.282* |
| | Vøru- og tænastuskuld | 32.110.734 | *51.092* |
| | Onnur skuld | 15.426.040 | *17.461* |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **68.607.089** | ***214.586*** |
| | **Skuld tilsamans** | **898.607.089** | ***782.819*** |
| | **SKYLDUR tilsamans** | **1.960.372.677** | ***1.742.038*** |
| | | | |
| **12** | **Veðsetingar og trygdarveitingar** | | |
| **13** | **Eventualpostar** | | |

# Peningastreymsuppgerð

| Nota | | 2015 DKK | 2014 t. DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ársúrslit** | **103.066.828** | ***57.763*** |
| 14 | Reguleringar | 118.416.463 | *97.810* |
| | Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| | Vørugoymslur | 19.466.811 | *9.302* |
| | Áogn | -8.877.540 | *-13.269* |
| | Vøru og tænastuskuld | -18.981.101 | *11.511* |
| | Onnur rakstrarskuld | -4.357.574 | *16.513* |
| | **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | **208.733.887** | ***179.629*** |
| | Móttiknar rentuinntøkur og líknandi inntøkur | 204.064 | *567* |
| | Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | -25.033.968 | *-21.180* |
| | **Peningastreymar frá rakstrinum** | **183.903.983** | ***159.016*** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -149.924.055 | *-218.405* |
| | Broyting arbeiði í gerð | -82.156.179 | *-56.789* |
| | **Peningastreymar frá íløgum** | **-232.080.234** | ***-275.194*** |
| | Lántøka | 158.020.121 | *210.720* |
| | Avdráttir upp á langfreistaða skuld | -19.431.505 | *-29.563* |
| | Minking í trekki upp á kassakreditt (max. 30 mió.) | 17.434 | *-114* |
| | **Peningastreymar frá fígging** | **138.606.049** | ***181.044*** |
| | **Samlaðir peningastreymar í árinum** | **90.429.798** | ***64.867*** |
| | Tøkur peningur við ársbyrjan | 131.459.477 | *66.593* |
| | **Tøkur peningur við árslok** | **221.889.275** | ***131.459*** |
| | Loyvt trekk á kassakreditt | 268.600.000 | *130.982* |
| | **Tilsamans** | **490.489.276** | ***262.441*** |

# Virkisbýti, framleiðsla og net

| RAKSTUR | | 2015 | | | 2014 (tkr.) | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| tkr. | Framleiðsla | Net | Tilsamans | Framleiðsla | Net | Tilsamans |
| **Inntøkur** | 234.920.333 | 187.032.165 | 421.952.498 | 278.328 | 132.223 | 410.551 |
| Oljuútreiðslur | -85.944.814 | -251.118 | -86.195.931 | -141.238 | -263 | -141.500 |
| Tilfar og tænastuveitingar | -21.280.390 | -28.655.319 | -49.935.709 | -21.139 | -28.694 | -49.834 |
| Lønir | -32.021.973 | -32.315.593 | -64.337.566 | -30.881 | -32.764 | -63.644 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **95.673.156** | **125.810.135** | **221.483.291** | **85.070** | **70.502** | **155.573** |
| Avskrivingar | -59.230.163 | -34.356.396 | -93.586.559 | -47.366 | -29.831 | -77.197 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **36.442.993** | **91.453.739** | **127.896.732** | **37.704** | **40.671** | **78.376** |
| Fíggjarpostar, netto | -11.220.652 | -13.609.252 | -24.829.904 | -11.773 | -8.840 | -20.613 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | 25.222.341 | 77.844.487 | 103.066.828 | 25.931 | 31.831 | 57.763 |
| Skattur | - | - | - | - | - | - |
| **Ársúrslit** | **25.222.341** | **77.844.487** | **103.066.828** | **25.931** | **31.831** | **57.763** |

# Virkisbýti, framleiðsla og net

| FÍGGJARSTØÐA | | 2015 | | | *2014 (tkr.)* | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| tkr. | Framleiðsla | Net | Tilsamans | Framleiðsla | Net | Tilsamans |
| **AKTIV** | | | | | | |
| Fastar ognir, elverk v.m. | 906.444.459 | 495.799.270 | 1.402.243.729 | 922.036 | 423.870 | 1.345.906 |
| Íløguarbeiði í gerð | 131.734.846 | 92.696.352 | 224.431.198 | 53.690 | 88.585 | 142.275 |
| **Materiell støðisogn** | **1.038.179.305** | **588.495.622** | **1.626.674.927** | **975.726** | **512.455** | **1.488.181** |
| Partapeningur | - | 2.850.000 | 2.850.000 | – | *2.850* | *2.850* |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **-** | **2.850.000** | **2.850.000** | **–** | ***2.850*** | ***2.850*** |
| **STØÐISOGN TILSAMANS** | **1.038.179.305** | **591.345.622** | **1.629.524.927** | **975.726** | **515.305** | **1.491.031** |
| Olja á goymslu | 11.744.354 | - | 11.744.354 | 19.773 | - | 19.773 |
| Tilfar á goymslu | - | 15.293.017 | 15.293.017 | - | 16.793 | 16.793 |
| Arbeiði í gerð | – | – | – | – | – | – |
| Arb. í gerð frem.rokn. | - | - | - | - | 9.938 | 9.938 |
| **Goymslur tilsamans** | **11.744.354** | **15.293.017** | **27.037.371** | **19.773** | **26.731** | **46.504** |
| Elskuldarar | - | 74.200.996 | 74.200.996 | - | 63.644 | 63.644 |
| Skuldarar aðrir | | 3.332.677 | 3.332.677 | - | 5.160 | 5.160 |
| Millumr. Net/Fram | | 88.939.773 | 88.939.773 | - | 44.943 | 44.943 |
| Onnur áogn / tíðaravmark. | | 4.387.430 | 4.387.430 | 1.655 | 2.584 | 4.239 |
| **Skuldarar tilsamans** | **-** | **170.860.877** | **170.860.877** | **1.655** | **116.331** | **117.986** |
| **Tøkur peningur** | **-** | **221.889.276** | **221.889.276** | **-** | **131.459** | **131.459** |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS** | **11.744.354** | **408.043.169** | **419.787.523** | **21.428** | **274.522** | **295.950** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **1.049.923.659** | **999.388.791** | **2.049.312.451** | **997.154** | **789.827** | **1.786.981** |

# Virkisbýti, framleiðsla og net

| FÍGGJARSTØÐA | | 2015 | | | 2014 (tkr.) | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| tkr. | Framleiðsla | Net | Tilsamans | Framleiðsla | Net | Tilsamans |
| **PASSIV** | | | | | | |
| Innskot | | 4.139.875 | 4.139.875 | | 4.140 | 4.140 |
| Kapitalkonto | 610.866.153 | 427.914.516 | 1.038.780.669 | 587.497 | 348.217 | 935.714 |
| **Eginogn tilsamans** | **610.866.153** | **432.054.391** | **1.042.920.544** | **587.497** | **352.356** | **939.854** |
| Eftirløn | - | 18.845.044 | 18.845.044 | | 19.366 | 19.366 |
| Aðrar avsetingar | - | - | - | - | - | - |
| **Avsetingar tilsamans** | **-** | **18.845.044** | **18.845.044** | **-** | **19.366** | **19.366** |
| **Langfreistað skuld** | **349.676.494** | **480.323.506** | **830.000.000** | **248.718** | **319.515** | **568.233** |
| Stuttfr. partur av langfreistaðari skuld | - | - | - | 115.758 | 7.420 | 123.178 |
| Frá aktiv (peningastovnar) | - | 1.589.119 | 1.589.119 | | 1.572 | 1.572 |
| Inngoldið av ognarum | - | 19.481.196 | | - | 21.282 | 21.282 |
| Aðrir ognarar | - | 14.984.800 | 14.984.800 | 237 | 17.224 | 17.461 |
| Millumrokning Net/Framl. | 88.939.773 | - | 88.939.773 | 44.943 | - | 44.943 |
| Onnur skuld | 441.239 | 32.110.734 | 32.551.973 | | 51.092 | 51.092 |
| Vøru- og tænastuskuld | 89.381.012 | 68.165.850 | 157.546.862 | 160.939 | 98.590 | 259.529 |
| **Skuld tilsamans** | **439.057.506** | **548.489.356** | **987.546.862** | **409.657** | **418.104** | **827.762** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **1.049.923.660** | **999.388.791** | **2.049.312.451*** | **997.154** | **789.827** | **1.786.981** |

*Tilsamans 2,049.312,5 frádrigið millumrokning á 88.939,8 samsvarar við javnan á 1.960.372,7

# Rakstrarbýti, framleiðsla og net

INNTØKUBÝTI

| | Framleiðsla | Net | Tilsamans 2015 | 2014(tkr) |
|---|---|---|---|---|
| Søla | 6.749.060 | 417.604.994 | 424.354.054 | 413.089 |
| Eginframleiðsla v.m. | 210.125.342 | -212.526.898 | -2.401.556 | -2.538 |
| Netábyrgd v.m. | 18.045.931 | -18.045.931 | – | – |
| **Inntøka tilsamans** | **234.920.333** | **187.032.165** | **421.952.498** | **410.551** |

FRAMLEIÐSLA

| | Termisk | Vatn | Vind | Tilsamans 2015 | 2014(tkr) |
|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 151.824.888 | 63.302.517 | 19.792.928 | 234.920.333 | 278.328 |
| Olja | -84.566.946 | -1.377.868 | | -85.944.814 | -141.238 |
| Tilfar | -10.219.001 | -5.197.492 | -5.863.898 | -21.280.390 | -21.139 |
| Lønir | -22.688.821 | -8.617.604 | -715.549 | -32.021.973 | -30.881 |
| Avskriving | -18.353.159 | -28.070.634 | -12.806.371 | -59.230.163 | -47.366 |
| Rentur | -117.500 | -7.102.763 | -4.000.389 | -11.220.652 | -11.773 |
| **Framleiðsluúrslit** | **15.879.462** | **12.936.158** | **-3.593.278** | **25.222.341** | **25.931** |

NET

| | Net uttan fyrisiting | Fyrisiting | Tilsamans 2015 | 2014(tkr) |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 16.139.495 | 170.892.670 | 187.032.165 | 132.223 |
| Olja | -222.550 | -28.568 | -251.118 | -263 |
| Tilfar | -11.815.439 | -16.839.880 | -28.655.319 | -28.694 |
| Lønir | -21.109.783 | -11.205.810 | -32.315.593 | -32.764 |
| Avskriving | -28.727.961 | -5.628.434 | -34.356.396 | -29.831 |
| Rentur | | -13.609.252 | -13.609.252 | -8.840 |
| **Netúrslit** | **-45.736.238** | **123.580.725** | **77.844.487** | **31.831** |

# Notur

| 1. NETTOUMSETNINGUR | 2015 DKK | 2014 t. DKK |
|---|---|---|
| *kWt gjald o.a.* | 385.049.525 | *379.210* |
| *Fast gjald* | 16.428.281 | *16.477* |
| *Íbinding* | 16.175.093 | *14.656* |
| *Ómaksgjøld, áminning og onnur søla* | 6.701.155 | *2.745* |
| *Keyp av vindorku v.m.* | -2.401.556 | *-2.538* |
| **Tilsamans** | **421.952.498** | ***410.551*** |

| 2. OLJUÚTREIÐSLUR | | |
|---|---|---|
| *Gassolja* | 7.785.561 | *8.421* |
| *Tungolja* | 73.583.881 | *127.245* |
| *Smyrjiolja* | 4.826.489 | *5.835* |
| ***Tilsamans*** | **86.195.931** | ***141.500*** |

| 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR | | |
|---|---|---|
| Linjur | 3.693.829 | *3.966* |
| Byrging, rør og tunlar | 264.020 | *290* |
| Tangar og umhvørvi | 274.703 | *423* |
| Maskinur | 8.634.886 | *10.094* |
| El og teknikk | 993.258 | *1.335* |
| Bygningar og lendi | 2.097.241 | *1.972* |
| Aðalfundur og nevnd | 313.545 | *362* |
| Kanning og ráðgeving | 10.529.757 | *7.853* |
| Kunningartøkni | 4.423.458 | *2.245* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 2.751.426 | *3.867* |
| Tap upp á skuldarar | -340.458 | *863* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.036.672 | *431* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 15.263.372 | *16.133* |
| ***Tilsamans*** | **49.935.709** | ***49.834*** |

| *4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR* | 2015 DKK | 2014 t. DKK |
|---|---|---|
| *Lønir* | 55.415.325 | *55.310* |
| *Pensjónir* | 6.783.250 | *6.294* |
| *Almenn gjøld* | 2.138.990 | *2.041* |
| ***Tilsamans*** | **64.337.566** | ***63.644*** |
| *í starvsfólkaútreiðslunum innganga fylgjandi:* | | |
| *Stjórn og nevnd* | 2.191.504 | *1.979* |
| ***Tilsamans*** | **2.191.504** | ***1.979*** |
| *Ársverk* | 134 | 128 |
| *Miðaltal av starvsfólkum* | 161 | 160 |

### *5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR*

| | | |
|---|---|---|
| *Rentur, lán og bankaskuld v.m.* | 25.033.968 | *21.180* |
| ***Tilsamans*** | **25.033.968** | ***21.180*** |

### *6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI*

| | | |
|---|---|---|
| *Partafelagsskattur* | 0 | *0* |
| *Javning av útsettum skatti* | 0 | *0* |
| ***Tilsamans*** | **0** | ***0*** |

### *7. MATERIELL STØÐISOGN*

| Upphædd í DKK | Framleiðsluvirkir | Býtisvirkir | Bygningar | Rakstrargøgn | Tils. 2015 | *2014* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 1.796.308.695 | 780.210.254 | 69.980.140 | 159.926.861 | 2.806.425.950 | *2.581.385.794* |
| Tilgongd í árinum, netto | 42.600.270 | 95.327.712 | 400.580 | 11.595.493 | 149.924.055 | *218.404.641* |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.838.908.965** | **875.537.966** | **70.380.719** | **171.522.353** | **2.956.350.005** | ***2.799.790.435*** |
| Av- og niðurskriving primo | -882.913.819 | -421.410.157 | -29.811.129 | -126.384.612 | -1.460.519.717 | *-1.376.687.168* |
| Avskrivingar í árinum | -58.366.812 | -24.588.313 | -1.337.806 | -9.293.628 | -93.586.559 | *-77.197.033* |
| Av- og niðurskriving ultimo | -941.280.631 | -445.998.469 | -31.148.935 | -135.678.240 | -1.554.106.276 | *-1.453.884.201* |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **897.628.335** | **429.539.497** | **39.231.784** | **35.844.113** | **1.402.243.729** | ***1.345.906.233*** |
| Roknskaparligt virði ultimo 2014 | 913.394.876 | 358.800.097 | 40.169.011 | 33.542.249 | 1.345.906.233 | |
| Arbeiði í gerð | | | | | | |
| Arbeiði í gerð primo | 53.512.181 | 86.274.327 | 1.488.367 | 1.000.144 | 142.275.019 | *85.486.142* |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 118.677.872 | 92.578.457 | 499.655 | 5.533.844 | 217.289.827 | *260.707.051* |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -40.584.820 | -92.162.995 | -400.580 | -1.985.253 | -135.133.648 | *-203.918.175* |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **131.605.232** | **86.689.789** | **1.587.443** | **4.548.735** | **224.431.198** | ***142.275.019*** |
| Arbeiði í gerð ultimo 2014 | 53.512.181 | 86.274.327 | 1.488.369 | 1.000.144 | 142.275.019 | |
| **Støðisogn ultimo** | **1.029.233.567** | **516.229.286** | **40.819.227** | **40.392.848** | **1.626.674.927** | ***1.488.181.252*** |
| Støðisogn ultimo 2014 | 966.907.057 | 445.074.424 | 41.657.378 | 34.542.393 | 1.488.181.252 | |

### *8. KAPITALPARTAR*

| | *31.12.15* | *31.12.14* |
|---|---|---|
| | *DKK* | *t. DKK* |
| Útveganarvirði primo | 2.850.000 | *2.850* |
| Útveganarvirði ultimo | 2.850.000 | *2.850* |
| Roknskaparligt virði ultimo | 2.850.000 | *2.850* |

**Assosierað virkir**

| Navn og heimstaður / | Ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit | Innroknað virði |
|---|---|---|---|---|
| P/F Fjarhitafelagið, Tórshavn | 50% | 57.444.936 | 3.419.299 | *2.750.000* |
| P/F FDS, Tórshavn | 20% | 652.827 | -23.131 | *100.000* |

Eingir roknskapir hjá P/F Fjarhitafelagnum og P/F FDS fyriliggja fyri 2015. Upplýstu tølini eru fyri 2014. FDS er farið í sjálvbodna avtøku í 2016, og verður innrokna virðið í 2016 tískil 0 DKK.

### *9. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN*

| | *31.12.15* *DKK* | *31.12.14* *t. DKK* |
|---|---|---|
| Vøru- og tænastuáogn | 77.950.996 | *67.994* |
| Aðrir skuldarar | 3.682.677 | *5.502* |
| Niðurskrivingar av áogn | -4.100.000 | *-4.700* |
| **Tilsamans** | **77.533.673** | **68.796** |

### *10. EGINOGN*

| **Upphædd í DKK** | **Innskot kr.** | **Flutt úrslit kr.** | **Tilsamans kr.** |
|---|---|---|---|
| Eginogn 01.01 | 4.139.875 | 935.713.841 | 939.853.716 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 0 | 103.066.828 | 103.066.828 |
| **Eginogn pr. 31.12** | **4.139.875** | **1.038.780.669** | **1.042.920.544** |

## 11. SKYLDUR

| | Avdráttur fyrsta árið DKK | Restskuld eftir 5 ár DKK | Skuld tilsamans 31.12.14 DKK | Skuld tilsamans 31.12.13 t. DKK |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 0 | 0 | 830.000.000 | *568.233* |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **830.000.000** | ***568.233*** |

Felagið hevur í árinum upptikið nýggj lán fyri í alt 158 mió. kr. Langfreistaða skuldin var fyribils endurfíggjað í juli 2015 av lánisamtakinum Skandinaviska Enskilda Banken, Íleggingargrunninum, BankNordik og Eik Banka. SEV arbeiðir við einari langtíðar loysn, sum væntandi verður endalig á sumri 2016. Eingin avdráttur er fyrsta árið, og verandi láníavtala fellur til gjaldingar áðrenn 5 ár. Tískil verður skuldin umfíggjað í 2016 til langfreistað skuld, eins og nýggj lántøka verður fingin til vega at fíggja komandi íløgur.

## 12. VEÐSETINGAR OG TRYGDARVEITINGAR

Sum trygd fyri skuld til peningastovnar, er latið veð í grundøkjum og bygningum fyri tilsamans 646 mió. kr.

## 13. EVENTUALSKYLDUR

Felagið hevur eventualskyldur fyri tilsamans 0 mió kr.

| 14. REGULERINGAR | 2015 DKK | 2014 t. DKK |
|---|---|---|
| Avskrivingar | 93.586.559 | *77.197* |
| Rentuinntøkur og líknandi inntøkur | -204.064 | *-567* |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir | 25.033.968 | *21.180* |
| **Tilsamans** | **118.416.463** | ***97.810*** |

15. Sundurgreining av eginogn

| | *Kommunuinnskot* | *Eginogn 2015* | *Eginogn 2015* | *Eginogn 2014* |
|---|---|---|---|---|
| | ***DKK*** | ***DKK*** | **%** | ***t. DKK*** |
| Eiðis | 78.625 | 14.507.284 | 1,40 | *13.136* |
| Eysturkommunan | 146.500 | 42.634.944 | 4,10 | *38.428* |
| Fámjins | 23.125 | 1.837.167 | 0,18 | *1.767* |
| Fuglafjarðar | 136.250 | 31.675.293 | 3,05 | *29.210* |
| Fugloyar | 17.500 | 844.674 | 0,08 | *768* |
| Hovs | 22.875 | 2.322.855 | 0,22 | *2.247* |
| Húsa | 17.500 | 886.908 | 0,09 | *941* |
| Húsavíkar | 25.125 | 2.470.673 | 0,24 | *2.247* |
| Hvalbiar | 103.625 | 15.014.089 | 1,45 | *13.904* |
| Hvannasunds | 36.375 | 8.404.511 | 0,81 | *7.586* |
| Klaksvíkar | 520.250 | 104.739.635 | 10,08 | *94.121* |
| Kunoyar | 12.625 | 2.850.776 | 0,27 | *2.477* |
| Kvívíkar | 59.125 | 12.290.014 | 1,18 | *10.966* |
| Nes / Runavíkar | 332.133 | 108.709.605 | 10,47 | *96.617* |
| Porkeris | 51.000 | 6.503.993 | 0,63 | *5.800* |
| Sands | 72.250 | 11.128.586 | 1,07 | *10.101* |
| Sjóvar | 92.875 | 20.018.785 | 1,93 | *18.014* |
| Skálavíkar | 30.750 | 2.787.426 | 0,27 | *2.689* |
| Skopunar | 71.000 | 9.375.887 | 0,90 | *8.603* |
| Skúvoyar | 17.875 | 908.025 | 0,09 | *826* |
| Sørvágs | 127.500 | 23.524.184 | 2,26 | *20.933* |
| Sumbiar | 81.375 | 7.327.551 | 0,71 | *6.798* |
| Sunda | 177.367 | 35.666.380 | 3,43 | *31.610* |
| Tórshavnar | 1.092.500 | 433.296.889 | 41,71 | *388.850* |
| Tvøroyrar | 255.250 | 35.793.081 | 3,45 | *33.224* |
| Vága kommuna | 169.625 | 42.043.672 | 4,05 | *38.255* |
| Vágs | 218.375 | 28.106.543 | 2,71 | *25.580* |
| Vestmanna | 125.250 | 25.635.870 | 2,47 | *23.333* |
| Viðareiðis | 25.250 | 7.475.369 | 0,72 | *6.683* |
| **Tilsamans** | **4.139.875** | **1.038.780.669** | **100%** | ***935.714*** |

# Elkervið


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60kV Koplingarstøð
Vindorka
60kV
20kV
10kV
6kV
Sjókaðal

Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn · Tlf. +298 34 68 00 · sev@sev.fo · www.sev.fo